BÚSKAPARRÁÐIÐ

**Heystið**

# 2023

# Búskaparráðsfrágreiðing

Konjunkturmeting á heysti 2023

September 2023

Economic report from the Economic Council of the Faroe Islands, Autumn 2023.

BÚSKAPARRÁÐIÐ

# Búskaparráðið

Búskaparráðið hevur til uppgávu at fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum og at koma við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina. Skrivarauppgávan hjá Búskaparráðnum er við løgtingslóg nr. 72 frá 10. mai 2021 løgd til Landsbanka Føroya at røkja, og Búskaparráðið gevur við hesum út konjunkturfrágreiðingina, sum eftir lóg um Búskaparráð skal gerast tvær ferðir árliga; ávikavist tann 1. mars og 1. september.

Frágreiðingin liggur tøk at taka niður sum pdf-fílu á heimasíðuni hjá Landsbanka Føroya:

https://www.landsbankin.fo/fo-fo/buskaparraðið/fragreiðingar

Limir Búskaparráðsins eru:

Fróði Magnussen, cand.merc., formaður

Jan Otto S. Holm, cand.merc.fir.

Sanna Laksá, Ph.D. í búskaparfrøði

Helena Andreasen, cand.merc.aud.

Johnny í Grótinum, cand.polit.

Skrivarar Búskaparráðsins: Landsbanki Føroya, samstarv er við Hagstovu Føroya.

ISBN: 978-99918-3-804-5

# Innihaldsyvirlit

Samandráttur ... 4

Konjunkturmeting heystið 2023 ... 6

1 Bruttotjóðarúrtøka ... 7

Meting av vøkstrinum í BTÚ ... 7

BTÚ býtt á vakstrarískoyti ... 9

Altjóða útlit ... 10

2 Privat nýtsla og íløgur ... 11

Húsarhaldini ... 11

Vinnan ... 17

3 Almenn nýtsla og íløgur ... 21

Úrslitið á almennu roknskapunum ... 21

Ogn og skuld hjá almennari fyrisiting og tænastu ... 22

Nýtslan hjá almennari fyrisiting og tænastu ... 23

Íløgur almenna geirans ... 24

4 Nettoútflutningur ... 25

Handilsjavni ... 25

Fiskavøruútflutningur ... 26

Laksur ... 27

Uppsjóvarfiskur ... 28

Botnfiskur ... 30

5 Burðardygg umsiting av tilfeingi ... 31

6 Figgjarpolitiskt regluverk ... 33

Fylgiskjal 1 ... 38

Keldur ... 39

Tables and figures ... 40

Tíðindaskriv frá Búskaparráðnum 1. september 2023 ... 43

Summary ... 45

# Samandráttur

Búskaparráðið hevur endurskoðað vøksturin í BTÚ fyri árini 2022 – 2024 av dagførdum hagtølum, og Hagstova Føroya hevur endaliga uppgjørt vøksturin í BTÚ í leypandi prísum fyri árini 1998 til 2021. Vøksturin í BTÚ í leypandi prísum hevur Búskaparráðið í samstarvi við Hagstovu Føroya mett til at verða ávikavist 8,1% í 2022, 5,9% í 2023 og 1,4% í 2024.

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| BTÚ-vøkstur í leypandi prísum | -2,7% | 8,0% | 8,1% | 5,9% | 1,4% |

**Viðm.:** 2020 og 2021 er uppgerð hjá Hagstovu Føroya. 2022, 2023 og 2024 eru metingar Búskaparráðsins.

**Kelda:** Hagstova Føroya og Búskaparráðið.

Lyklatølini vísa framvegis, at føroyski búskapurin er í framgongd. Framleiðslan (BTÚ) er mett at veksa 5,9% í 2023, arbeiðsloysið er søguliga lágt, samlaðu lønarútgjaldingarnar veksandi, tal av fólki í starvi setur met, og handilsjavnin hevur framhaldandi stórt yvirskot.

Húsarhaldini hava upplivað stórar **prís- og rentuhækkingar** seinasta árið, men húsarhaldini eru kortini við gott mót sambært nýggjastu brúkarakanningini hjá Hagstovuni. Tað eru ikki fleiri húsarhald í juni 2023, enn í januar 2023, sum siga seg hava ilt við at fáa endarnar at røkka saman, og peningastovnarnir siga frá, at bert eitt vet fleiri húsarhald higartil í 2023 hava biðið um skáar, enn fyri einum ári síðani. **Prísirnir veksa nú spakuligari**, enn teir hava gjørt síðani á sumri 2022, men dýrkaðu gerandisvørurnar og øktu rentuútreiðslurnar hava økt um livikostnaðin hjá húsarhaldunum, og tí er ikki ósannlíkt, um nøkur teirra, sum frammanundan vóru fíggjarliga sperd, koma í eina verri støðu, um rentan hækkar uppaftur meira. Ilt er at spara uppá neyðsynjarvørur sum mat, olju og streym, og tí hava føroysku húsarhaldini valt at keypa minni av klæðum, skóm og dýrum innbúgvi í fyrsta ársfjórðingi í 2023 í mun til sama ársfjórðing árið fyri. Eisini bilasølurnar greiða frá, at eftirspurningurin eftir bilum er lækkaður munandi. Hinvegin hevur nýtslan hjá húsarhaldunum uttanlands verið eins stór á sumri 2023, sum í fjør, og tað bendir á, at tey eru við gott mót. **Arbeiðsloysið er søguliga lágt** (0,7% í juli 2023), og tað merkir, at allarflestu føroyingar eru í starvi, sum ger, at húsarhaldini kunnu varðveita eina ávísa nýtslu, hóast minni nú fæst fyri pengarnar.

Øktu livikostnaðirnir hava fingið bankarnar at seta størri krøv til tiltøkupeningin, og tað ávirkar, hvussu nógv húsarhald kunnu bjóða uppá eini sethús. Harafturat er byggitilfarið dýrkað nógv, og fólk eru vorðin afturhaldin við at byggja nýtt ella keypa sethús, sum krevja stóra umvæling. Í miðstaðarøkinum lækkaðu sølurnar í seinna hálvári 2022, men øktust aftur í fyrra hálvári 2023. **Sethúsaprísurin** í miðstaðarøkinum **er lækkaður** eitt lítið vet í fyrra hálvári 2023 í mun til fyrra hálvár 2022, men verður fyrra hálvár 2023 samanborið við alt árið 2022, eru sethúsaprísirnir í miðstaðarøkinum stórt sæð óbroyttir.

Konjunkturbarometrið hjá Hagstovuni vísir eitt munandi **lægri treysti hjá tilfeingisvinnuni** í juni 2023 í mun til í januar 2023. Hetta kemur av eitt nú lægri eftirspurningi, øktum goymslum og væntanum um prísfall í mun til í 2022. Prísurin á toski væntast at lækka í seinna hálvári 2023 og halda sær í 2024. Fyri laks eru bæði nøgdir og prísir mettir at vera óbroyttir í 2023 í mun til 2022, og líkt er til, at laksaprísurin lækkar eitt vet, meðan tøkunøgdin veksur eitt vet í 2024. Harafturat togar útflutningurin av fiskamjøli samlaða útflutningsvirðið upp í 2023, tí svartkjaftakvotan er hækkað munandi í 2023 samanborið við 2022. Eftirspurningurin eftir makreli er lítil í løtuni og ein partur av makrelinum er landaður uttanlands til ídnað, ið gevur eina lækking í útflutningingsvirðinum, men útfluttu nøgdirnar av makreli verða væntandi áleið tær somu í 2023 og 2024, sum í 2022. Harafturat kunnu politisku útmeldingarnar um broytingar í fiskivinnusamstarvinum við Russland og óvissurnar viðvíkjandi útflutninginum til Russlands hava havt sína ávirkan, tá ið umboðini fyri tilfeingisvinnuna svaraðu spurningunum í kanningini í juni 2023. Umframt fiskavørur sum fara av landinum, er **ferðavinnan** ein partur av útflutninginum. Higartil í ár hevur virksemið verið stórt innan flutning av ferðafólki, og nærum øll kømur á gistingarhúsunum vóru upptikin í juni mánaði.

Tað eru framvegis fleiri stórar verkætlanir í gongd hjá landi, kommunum og privatum fyritøkum, ið merkir, at stóru aktørarnir í **byggivinnuni** hava tryggjað arbeiði í minsta lagi 1,5 ár fram. Byggivinnan greiðir frá, at mangul á arbeiðsmegi er størsta og nærum einasta avmarkingin í framleiðsluni í løtuni.

**Úrslitið á fíggjarlógini** metir Búskaparráðið verður **-30 mió. kr. í 2023** og **-202 mió. kr. í 2024**. Metingin tekur støði í seinasta uppskoti til fíggjarlóg 2023, sum vísir eitt avlop á umleið 150 mió. kr. Búskaparráðið metir tó, at umleið 150 mió. kr. av støðlingum verða brúktar afturat í 2023 og Fíggjarmálaráðið metir í løtuni, at umleið 30 mió. kr. koma afturat í eykajáttanum til ymsar raktrarútreiðslur í 2023. Fyri fíggjarárið 2024 hevur Búskaparráðið framskrivað landskassans útreiðslur og inntøkur, og úrslitið er mett at gerast eitt hall á um 200 mió. kr. í 2024. Hetta svarar til játtanarkarmarnar í 2024 umframt at støðlingar á 50 mió. kr. eru lagdar afturat. Tað er lítil ivi í, at eitt hall á fíggjarlógini í 2023 og 2024 **ikki er nóg væl frágingið**, tá ið føroyski búskapurin framvegis er í vøkstri við metlágum arbeiðsloysi og inntøkuvøkstri í landskassanum. Hetta bæði sæð í mun til konjunkturstøðuna í løtuni og í mun til veksandi avbjóðingina við haldførinum, tá vit fara at gerast munandi fleiri eldri fólk í mun til tey í arbeiðsførum aldri.

**Tilmæli**

Føroyar standa fyri eini haldførisavbjóðing; um fá ár verða tað lutfalsliga fáir skattgjaldarar, ið skulu tryggja vælferðarsamfelagið, sum vit hava í dag. At talið av pensjónistum veksur lutfalsliga skjótari enn fólk í arbeiðsførum aldri ger, at almennu útreiðslurnar fara at veksa skjótari enn inntøkurnar. Neyðugt er at **fremja nýskipanir** nú**, sum betra um haldførið** – longri vit bíða, størri verður rokningin, sum vit lata yngru ættarliðunum. Ein nýskipan, sum er neyðug fyri at betra um haldførið, er at **hækka pensjónsaldurin**, ið vil ávirka bæði inntøku- og útreiðslusíðu landskassans.

Ein onnur nýskipan, sum ger útreiðslusíðuna betri, er at **seta í verk eitt fíggjarpolitiskt regluverk**. Seinastu nógvu árini hevur gongdin í almennu nýtsluni og íløgunum verið konjunkturviðgangandi. Tá ið inntøkurnar hava verið stórar, hevur nógv verið brúkt og øvugt. Hetta vísir, at tað er torført hjá politisku skipanini at standa ímóti og ikki at økja um nýtsluna í góðum tíðum. Harvið hevur fíggjarpolitikkurin ført til at økja trýstið á búskapin tey góðu árini. Fíggjarpolitiska regluverkið skal seta hámark fyri árliga vøksturin í almennu rakstrarútreiðslunum, so tað lættir um trýstið á politikararnar at økja almennu nýtsluna og íløgurnar, tá ið tað gongur væl í búskapinum.

Eisini eigur politiska skipanin at framskriva almennu inntøkurnar og útreiðslurnar, so hvørt sum politisk tiltøk verða skotin upp. Verður til dømis skotið upp at lata ein skattalætta, skal ikki bert roknast út, hvat uppskotið kostar í tí árinum, skattalættin verður settur í verk, men eisini, hvat skattalættin kostar 10 og 20 ár fram í tíð. Á henda hátt verður tað sjónligt, hvat samlaði skattalættin kostar. Ein framskriving hevði víst, hvussu stórur tørvurin er á at gera nýskipanir og sparingar, verður uppskotið framt, og hvørt uppskotið bøtir um, ella ger fíggjarpolitiska haldførið verri. Við atliti til komandi ættarliðini eigur politiska skipanin **ikki** at **samtykkja uppskot, sum leggja trýst á framtíðar almennu útreiðslurnar**, so sum at strika mótrokningina í pensjónini.

Stóra búskaparliga framgongdin í føroyska búskapinum, sæst aftur í lága arbeiðsloysinum. Føroyar hava í longri tíð havt søguliga lágt arbeiðsloysi og ein stór avbjóðing fyri búskapin er **trot á arbeiðsmegi**. Hetta merkir samfelagið týðiliga longu nú; eitt nú at foreldur ikki fáa ansað sínum børnum fulla tíð og at ellisheim mugu steingja stovur, tí tey vanta starvsfólk. Politiska skipanin eigur at taka henda trupulleika í størsta álvara. **At stytta arbeiðsvikuna minkar um útboðið av arbeiðsmegi**. Um landsstýrið heldur fast við ætlanina at stytta arbeiðsvikuna, verður neyðugt at økja arbeiðsútboðið á annan hátt, umframt at fíggja átakið, so tað ikki ger fíggjarpolitiska haldførið verri. Veksandi talið av eldri fólki fer at krevja ein enn størri starvsfólkahóp komandi árini. Avleiðingin av vantandi arbeiðsmegi er, at framleiðslan í landinum, og harvið vælferðin, verður minni, enn hon kundi verið. Eitt nú kann ein avleiðing verða, at vinnan fer at halda aftur við íløgum, tí tey fáa ikki arbeiðsfólk. Politiska skipanin eigur tí at **avtaka serskipanir, sum minka um arbeiðsútboðið** í Føroyum; eitt nú serskattaskipanir til føroyingar, sum arbeiða uttanlands ella almennur stuðul til fiskavirkir gjøgnum fiskavirkisskipanina, ið er við til at fasthalda arbeiðsmegi í eini ólønsamari vinnu. Tað eigur heldur ikki at vera latin stuðul til sjómenn gjøgnum sjómannafrádrátt ella til heimaflotan gjøgnum makrelkvotur. Eitt tiltak, sum hinvegin økir um arbeiðsútboðið, er at hækka pensjónsaldurin.

# Konjunkturmeting heystið 2023

# 1 Bruttotjóðarúrtøka

## Meting av vøkstrinum í BTÚ

Búskaparráðið og Hagstova Føroya hava í felag mett um vøksturin fyri 2023 og 2024, og av dagførdum hagtølum, endurmett vøksturin í BTÚ í leypandi prísum fyri árið 2022. Vøksturin í BTÚ er endaliga uppgjørdur til og við 2021. Vøksturin í BTÚ í leypandi prísum hevur Búskaparráðið í samstarvi við Hagstovu Føroya mett til at verða ávikavist 8,1% í 2022, 5,9% í 2023 og 1,4% í 2024[1], sí talvu 1.1. BTÚ í leypandi prísum er mett at verða 26,3 mia. kr. í 2023 og 26,6 mia. kr. í 2024.

**BTÚ-vøkstur í leypandi prísum** **Talva 1.1**

| 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|
| -2,7% | 8,0% | 8,1% | 5,9% | 1,4% |

**Viðm.:** 2020 og 2021 er uppgerð hjá Hagstovu Føroya. 2022, 2023 og 2024 eru metingar Búskaparráðsins.
**Kelda:** Hagstova Føroya og Búskaparráðið.

Í 2022 vaks útflutningurin í virði, meðan samlaðu nøgdirnar minkaðu í mun til árið fyri. Ein partur av vøkstrinum í BTÚ í leypandi prísum í 2022 stavaði tí frá prísvøkstri. Var BTÚ ístaðin mátað í føstum prísum, vildi vøksturin í BTÚ í 2022 verið lægri, tí BTÚ í føstum prísum mátar broytingina í nøgdum og sáldar prísvøksturin frá. Árliga broytingin í BTÚ í føstum prísum er mátið fyri realan búskaparvøkstur. Higartil í 2023 er útflutningurin øktur í nøgdum (juni 2023), og útflutningurin gevur tískil eitt positivt íkast til reala vøksturin í BTÚ í 2023.

Mynd 1.1 vísir føroysku bruttotjóðarúrtøkuna í ávikavist leypandi og føstum prísum í tíðarskeiðinum 2008 – 2024. Hagstova Føroya hevur endaliga uppgjørt BTÚ í føstum prísum fram til 2021, og Búskaparráðið hevur í samstarv við Hagstovuna mett um vøksturin í BTÚ í leypandi prísum fram til 2024.

**BTÚ, ársins prísir og fastir 2010-prísir (leinkjað virði), 2008-2024** **Mynd 1.1**




**Viðm.:** Hagstova Føroya hevur gjørt upp BTÚ í ársins prísum og føstum prísum fyri árini 2008 til 2021. BTÚ í ársins prísum 2022 til 2024 eru metingar Búskaparráðsins.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

Mynd 1.2 vísir árligu broytingina í BTÚ í føstum prísum fyri árini 2009 – 2021 og vakstraríkoytið til reala búskaparvøksturin býtt á vinnugreinabólkar. Reali búskaparvøksturin var í miðal 2,6% í Føroyum í árunum 2008 – 2021, ið er hægri, enn í okkara grannalondum. Reali búskaparvøksturin var í sama tíðarskeiði 1,2% í Danmark og 1,4% í Íslandi. Reali búskaparvøksturin var stórur í Føroyum í árunum

[1] Í vár 2022 metti Búskaparráðið í samstarvi við Hagstovu Føroya, at vøksturin í BTÚ í leypandi prísum fór at verða 10,8% í 2022, 2,6% í 2023 og 1,3% í 2024.

2011 – 2014 og hetta kemur av, at føroyski búskapurin kom fyri seg eftir búskaparligu afturgongdina undir fíggjarkreppuni í 2008; tað vóru serliga tænastuvinnan og framleiðsluvinnan (millum annað byggivinnan), sum vuksu hesi árini. Eisini stavaði reali búskaparvøksturin í hesum tíðarskeiði frá tilfeingisvinnuni orsakað av, at tað varð fiskað og útflutt størri nøgdir av makreli, enn frammanundan, eftir at Føroyar í 2010 tillutaði sær størri makrelkvotu. Í 2015 minkaði mongdin av útfluttum makreli og laksi í mun til árið fyri, og tí er reali búskaparvøksturin ikki eins stórur í 2015 sum í árunum frammanundan. Í 2016 vaks prísurin á laksi við nærum 50%, men í 2016 sæst bert ein stórur vøkstur í BTÚ í leypandi prísum (sí mynd 1.3), og ikki tá mátað verður í føstum prísum (mynd 1.2). Í 2019 vaks útflutta mongdin av laksi, toski og hýsu í mun til árið fyri, sum gevur ein realan búskaparvøkstur hetta árið. Í 2020 sæst hinvegin eitt fall í realum BTÚ og stavar hetta frá lægri virksemi í eitt nú gisti- og matstovuvinnuni og í flog- og sjóflutningi, umframt at lægri nøgdir vóru útfluttar av fleiri ymsum fiskasløgum meðan koronufarsóttin gjørdi um seg um allan heimin. Í 2021 kom realur búskaparvøkstur av, at føroyski búskapurin fótaði sær eftir koronufarsóttina, umframt at útflutningurin av makreli vaks og tøkunøgdin av laksi setti met.

**Realur búskaparvøkstur og vakstrarískoyti, 2009-2021** **Mynd 1.2**




**Viðm.:** Fastir 2010-prísir, leinkjaði virði
**Kelda:** Hagstova Føroya.

Til metingina av vøkstrinum í BTÚ er nýttur ein búskaparmyndil til framrokningar sum er mentur í Landsbankanum og síðani á Hagstovuni, ið verður viðlíkahildin av Hagstovuni og Búskaparráðnum í felag. Sum íkast til búskaparmyndilin liggja metingar hjá Búskaparráðnum og Hagstovuni av lutum í búskaparligu gongdini, sum verður greitt frá í hesi frágreiðing.

Konjunkturfrágreiðingin er skipað í partar eftir eftirspurnar- ella útreiðslupørtunum av BTÚ. Eftirspurningurin eftir vørum og tænastum kemur frá innlandi til nýtslu og íløgur[2] og frá útlandi sum útflutningur. Innflutningurin er partur av innlendis eftirspurninginum og fevnir eisini um tilfarsnýtslu í framleiðsluni. BTÚ er sostatt samansett av hesum eftirspurnarpørtum:

**BTÚ = privat nýtsla + privatar íløgur + almenn nýtsla + almennar íløgur + útflutning - innflutning**

[2] Munurin millum nýtslu og íløgur er, at íløgur, sum meginreglu, hava eina livitíð uppá meira enn 1 ár.

## BTÚ býtt á vakstraráskoyti

Mynd 1.3 vísir vøksturin í BTÚ í leypandi prísum, og hvar árliga broytingin í BTÚ stavar frá. Vøksturin í BTÚ í leypandi prísum er mettur til 8,1% í 2022, 5,9% í 2023 og 1,4% í 2024. Vakstraráskoytini eru býtt á ávikavist privata nýtslu og íløgur, almenna nýtslu og íløgur, útflutning, innflutning og broytingar í goymslunum. Er innflutningurin størri enn árið fyri, gevur tað eitt negativt íkast til BTÚ vøksturin, tí innflutningurin so at siga er ein útreiðsla hjá føroyska búskapinum, meðan øktur útflutningur merkir økta inntøku til føroyska búskapin. Økir tað almenna ella privata sína nýtslu ella íløguvirksemi, merkir tað, at fleiri vørur ella tænastur eru keyptar í mun til árið fyri, sum er ein inntøka hjá onkrum parti av føroyska búskapinum.

**BTÚ vøkstur í leypandi prísum og vakstraráskoyti, 1999-2024** **Mynd 1.3**




**Kelda:** Hagstova Føroya hevur gjørt upp BTÚ fyri árini 1998 til 2021. 2022 til 2024 eru metingar Búskaparráðsins.

Í 2022 sæst ein høgur vøkstur í BTÚ í leypandi prísum. Vøksturin í 2022 avspeglar tó ikki eitt munandi størri virksemi, enn árið fyri, men heldur, at vørurnar og tænasturnar, sum vit útfluttu og innfluttu, vóru øktar í prísi. Í 2023 og 2024 eru prísirnir ikki mettir at veksa eins nógv, sum í 2022, og vøksturin í BTÚ í leypandi prísum hesi bæði árini verður tí lægri, enn í 2022.

Privata nýtslan svarar í støðd til nærum helvtina av BTÚ, og gongdin í privatu nýtsluni hevur tí stóran týdning fyri vøksturin í BTÚ í mun til árið fyri. Ávísin fyri treystið hjá húsarhaldunum er sambært nýggjastu brúkarakanningini eitt vet hægri, enn í kanningini frá í januar 2023 og ávísin fyri treystið er beint undir langtíðar miðalið. Húsarhaldini eru í nýggjastu kanningini frá juni mánaði eitt vet meira bjartskygd um sína egnu fíggjarstøðu komandi árið, um arbeiðsloysið og búskaparstøðuna sum heild í Føroyum. Øktu livikostnaðirnir hava við sær, at tað nú skal ein størri partur av tøku inntøkuni hjá húsarhaldunum til fyri at halda áleið somu nýtslu, sum áðrenn inflasjónin tók dik á seg. **Privata nýtslan** gevur tí eitt positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2023 og eitt positivt, men minni ískoyti í 2024. Øktu renturnar og inflasjónin sum heild ávirka eisini, hvussu stór lán inntøkan hjá húsarhaldunum megnar at bera, og meklarar í Føroyum greiða frá, at húsarhald eru vorðin meira afturhaldin við at byggja nýtt ella at keypa sethús, sum krevja umvæling. Íløguvirksemið hjá húsarhaldunum er tí ikki eins stórt í 2023 og 2024, sum tað var í 2022, men íløguvirksemið er tó størri í 2023 enn í 2022, tá talan er um størri privatar verkætlanir hjá fyritøkum, meðan tær eru mettar at minka í 2024. **Privatu íløgurnar** geva samanumtikið eitt positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2023 og eitt negativt ískoyti í 2024. Av stórum privatum íløgum, sum ikki eru innlendis framleiddar, eru keyp av nýggjum skipum, og fleiri skip eru keypt í bæði 2022 og 2023.

**Almenna nýtslan** er mett at geva eitt positivt íkast til vøksturin í BTÚ í bæði 2023 og 2024, meðan **almennu íløgurnar** bert veksa eitt vet í 2023 í mun til 2022 og minka í 2024, eitt nú tí íløgan í Eystur- og Sandoyartunnilin verður liðug í ár. Samanlagt geva almenna nýtslan og íløgurnar eitt lítið positivt íkast til vøksturin í BTÚ í bæði 2023 og 2024.

Útflutningurin er í støðd meir enn helvtina av BTÚ, og sveiggj í nøgdum og prísum á ymsu fiskasløgunum - serliga á teimum, sum vit útflyta nógv av (td. laks) - hevur tí stóra ávirkan á vøksturin í BTÚ í mun til árið fyri. Útflutningurin gav eitt stórt positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ 2022, millum annað tí prísurin á laksi var serstakliga høgur í 2022. Á vári 2023 var laksaprísurin eisini høgur, men hann væntast at verða lægri í seinnu helvt av 2023, og laksaprísurin er tí mettir at verða áleið óbroyttir í 2023 mun miðalprísin í 2022. Harafturat verður tøkunøgdin væntandi eitt vet lægri í 2023 í mun til 2022, meðan hon hækkar aftur í 2024. Av pelagiskum fiski er millum annað mett at verða útflutt áleið tær somu nøgdirnar av makreli í 2023 og 2024, sum í 2022, meðan útflutningurin av fiskamjøli togar útflutningsvirðið upp í 2023, millum annað tí svartkjaftakvotan er hækkað munandi samanborið við í 2022. Útflutningurin av botnfiski fellur, millum annað verður minni av toski verður útflutt vegna lægri kvotu í Barentshavinum. Prísurin á toski hevur verið góður fyrra hálvár, men er fallandi í løtuni, meðan hýsuprísurin hevur verið fallandi alt 2023. Samanumtikið gevur **útflutningurin** eitt lítið positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2023 og eitt positivt ískoyti í 2024.

Innflutningur er ein útreiðsla fyri føroyska búskapin, so tá ið innflutningurin veksur, gevur tað eitt negativt ískoyti til vøksturin í BTÚ. Innflutningurin gav eitt stórt negativt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2022 vegna stóru príshækkingarnar; eitt nú vaks innflutningurin av olju nógv, tí oljuprísurin var dýrkaður munandi. Í 2023 eru prísirnir eisini øktir, tó ikki eins nógv, sum í 2022; eitt nú er oljuprísurin ikki eins høgur longur, og **innflutningurin** er tí mettur at geva eitt lítið negativt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2023. Í 2024 eru prísirnir á innfluttu vørunum ikki mettir at veksa eins nógv, sum í 2023, og innflutningurin gevur tí eitt lítið positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2024.

## Altjóða útlit

Sambært seinastu meting hjá IMF (juli 2023), væntast vøksturin í heimsbúskapinum at gerast 3% í 2023 og 2024 (í føstum prísum). Hetta er eitt vet hægri, enn hvat IMF metti í apríl 2023 (2,8%). Sambært IMF er ein vøkstur í heimsbúskapinum á 3% heldur lágur søguliga sæð. Metingarnar liggja undir langtíðar miðaltalinum fyri heimsbúskapin, sum í árunum 2000 – 2019 hevur havt ein árligan búskaparvøkstur á 3,8% í miðal. Mongu rentuhækkingarnar hjá miðbankum kring heimin, sum royna at minka um prísvøksturin, tálmar búskaparvøksturin. IMF metir, at inflasjónin kann fara at veksa aftur ella gerast torfør at minka, um nýggir stoytir raka heimsbúskapin, eitt nú um kríggið í Ukraina versnar ella um tað aftur kemur órógv á fíggjarmarknaðin, eins og í vár, tá fleiri bankar í USA og Sveits komu í fíggjarligar trupulleikar. Tey framkomnu londini eru mett at fáa ein lægri búskaparvøkstur í 2023 enn heimsbúskapurin sum heild; IMF metir búskaparvøksturin verða 1,5% í 2023 og 1,4% í 2024.

Globalu inflasjónina metir IMF fara at lækka frá 8,7% í 2022 til 6,8% í 2023 og 5,2% í 2024. Í januar 2023 var mett at inflasjónin fór at lækka til 6,6% í 2023, men inflasjónin er vorðin meira trek, enn áður mett vegna tað, at kjarnuinflasjónin er mett at lækka lutfalsliga spakuliga. Kjarnuinflasjón er inflasjón frároknað prísir á vørum sum sveiggja serliga nógv (prísir á matvørurum og orku). IMF metir tað vera ósannlíkt, at inflasjónin røkkur 2% innan 2025.

Sambært eini kanning hjá evropeiska miðbankanum, ECB, er inflasjónina í Evropa mett at gerast 5,5% í 2023, 2,7% í 2024, 2,2% í 2025 og 2,1% í langa høpinum. ECB miðar eftir eini inflasjón á 2% árliga. Í løtuni verður væntað, at ECB fer at hækka rentuna enn einaferð í september 2023, og at rentan møguliga verður verandi á sama støði fram til seinnu helvt av 2024[3].

[3] Keldur: World Economic Outlook update, Juli 2023, imf.org. og Press release, Results for the ECB Survey of Proffessional Forecasters for the third quarter of 2023, 28. July 2023, ecb.europa.eu.

# 2 Privat nýtsla og íløgur

## Húsarhaldini

Gongdin í privatu nýtsluni hevur stóra ávirkan á BTÚ, tí privata nýtslan er í stødd á støði við vøruútflutningin og -innflutningin, og nýtslan hjá húsarhaldunum er í stóran mun tengd at teirra treysti. Í nýggjastu brúkarakanningini hjá Hagstovuni (juni 2023) sæst, at føroysku húsarhaldini framvegis eru við gott mót, sí mynd 2.1. Samanborið við kanningina frá í januar 2023, eru húsarhaldini í hesi kanning frá juni mánaði vorðin eitt vet meira bjartskygd um sína egnu fíggjarstøðu komandi árið, um arbeiðsloysið og búskaparstøðuna sum heild í Føroyum.

**Vísital - samlað brúkaravísital fyri føroysku húsarhaldini, jan-06 til jun-23** **Mynd 2.1**




**Kelda:** Hagstova Føroya.

Umleið líka nógv húsarhald siga í juni 2023 sum í kanningini frá í januar 2023, at tey hava ringt við at fáa endarnar at røkka saman, sí grønu stabbarnir í mynd 2.2.

**Lýsing av aktuellu fíggjarstøðuni hjá húsarhaldunum** **Mynd 2.2**




**Kelda:** Hagstova Føroya.

Í nýggjastu kanningini svara eitt vet fleiri húsarhald í mun til kanningina í januar 2023, at tey ikki vænta, at tey fara at spara upp komandi árið, og kann tað hanga saman við, at livikostnaðurin hjá húsarhaldunum er øktur. Seinastu nærum 10 árini hava føroysk húsarhald økt um síni innlán í føroysku bankunum[4], ið kann benda á, at tey hava økt um sína uppsparing. Hendan gongdin vendi tó á vári 2022, sum kann vera tekin um, at húsarhaldini hava brúkt burturav síni uppsparing. Síðani á vári 2023 er vøksturin í innlánum hjá húsarhaldunum øktur aftur.

**Arbeiðsloysi og nettotilflyting, jan-99 til jul-23** **Mynd 2.3**




**Viðm.:** Leypandi 12-mánaðar samanlegging. Nettotilflytingin er bert til og við juni 2023.
**Kelda:** Hagstova Føroya og egnar útrokningar

Í mynd 2.1 sæst, at bjartskygnið hjá húsarhaldunum gjørdist serliga lágt undir fíggjarkreppuni. Tá var arbeiðsloysið eisini sera høgt, sí mynd 2.3. Í juli 2023 var arbeiðsloysið hinvegin framvegis søguliga lágt (0,7%). Sambært brúkarakanningini eru húsarhaldini við gott mót, og kann tað møguliga skyldast, at tey ikki eru stúrin fyri at missa arbeiðið, nú arbeiðsloysið er so mikið lágt. Mynd 2.4 vísir, at løntakaratalið setti met í juli 2023 við 28.156 løntakarum. Hetta merkir, at allarflestu arbeiðsførir føroyingar eru í starvi, og tað ger, at húsarhaldini kunnu varðveita eina ávísa nýtslu.

**Tal av løntakarum og fulltíðar arbeiðsleysum, jan-08 til jul-23** **Mynd 2.4**




**Viðm.:** Árstíðarjavnað.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

[4] Húsarhald, NPISH ikki íroknaði. Kelda: Landsbanki Føroya, MFI hagtøl.

Føroysku peningastovnarnir greiða somuleiðis frá, at húsarhaldini sum heild eru betri fyri, enn tey vóru eftir fíggjarkreppuna í 2008. Sambært peningastovnunum eru tað bert eitt vet fleiri húsarhald, sum higartil í 2023 hava biðið um skáar, samanborið við undanfarnu árini, og at trotini ikki eru størri, enn tey plaga at vera. Tó slepst ikki undan, at summi húsarhald, sum longu frammanundan rentuhækkingarnar høvdu ilt við at fáa endarnar at røkka saman, fara at koma í eina uppaftur verri fíggjarligari støðu, um rentan hækkar enn meira.

**Inflasjón, %-broyting í brúkaraprístalinum, mai-12 til mai-23** **Mynd 2.5**




**Viðm.:** Prosentbroyting í brúkaraprístalinum í mun til sama ársfjórðing árið fyri.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

Prísirnir veksa framvegis, men spakuligari, enn teir hava tað seinasta árið. Í øðrum ársfjórðingi 2023 vaks brúkaraprístalið við 4,4%, og tað er munandi lægri, enn vøksturin í brúkaraprístalinum hevur verið síðani annan ársfjórðing 2022, sí mynd 2.5. Meðan oljuprísirnir høvdu størstu ávirkanina á brúkaraprístalið í byrjanini av 2022, hevur tað síðani verið øktir matvøruprísir, ið hava togað brúkaraprístalið upp. Í fyrsta ársfjórðingi 2023 var tað í mesta mun dýrkaðar matvørur, rentuútreiðslur og streymprísir, sum togaðu prísvøksturin upp, og í øðrum ársfjórðingi 2023 eru tað rentuhækkingar og dýrkaðar matvørur, sum gera seg galdandi.

**Brúkaraprístalið, útvaldir vørubólkar, %-broyting, mai-12 til mai-23** **Mynd 2.6**




**Viðm.:** Prosentbroyting í brúkaraprístalinum í mun til sama ársfjórðing árið fyri.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

Í mynd 2.6 eru teir 3 vørubólkarnir, sum fylla mest í nýtsluni hjá húsarhaldunum, vístir. Tann vørubólkurin, sum fyllir mest er matur og alkoholfríar drykkjuvørur, og hesin er øktur nógv síðani miðjan

2021. Flutningur er útreiðslur til keyp og rakstur av bili íroknað brennievni til bilin. Bólkurin 'býli' er øktur mest. Í hesum bólki fyllir oljunýtsla til upphiting av húsunum ein stóran part, men eisini elnýtsla og rentuútreiðslur og renturnar eru øktar nógv í 2022 og 2023.

Rentuútreiðslurnar hjá føroyskum sethúsaeigarum eru økt við heili 12% í árinum 2022 í mun til 2021[5]. Miðalrentan á bústaðarlánum hjá føroyskum húsarhaldum var í januar 2023 0,89 prosentstig hægri, enn í januar 2022, og tað er størsta hækkingin í eini 10 ár. Higartil í ár hevur Evropeiski miðbankin og danski tjóðbankin hækkað rentuna 4 ferðir afturat, og føroysku bankarnir hava hækkað sínar rentur samsvarandi. Hesar 4 rentuhækkingar geva føroyskum húsarhaldum, sum hava lán í føroyskum banka, eina samlaða rentuhækking á upp móti 1,05 prosentstigum í 2023.

Tað eru sostatt ikki bert dýrkaðu gerandisvørurnar, sum skerja tiltøkupeningin hjá føroysku húsarhaldunum, men eisini øktu rentuútreiðslurnar. Summi húsarhald hava realkredittlán við eini rentu, ið er føst í einum ávísum tíðarskeiði, men tey, sum hava eitt rentubindingartíðarskeið, sum gongur út í næstum, fara at merkja rentuhækkingarnar komandi tíðina. Rentan og inflasjónin hava annars verið lág seinasta áratíggju, samstundis sum lønirnar eru øktar, og tað merkir, at húsarhaldini hava fingið ein reallønarvøkstur hesi árini. Økta inflasjónin hevur tó minkað um henda reallønarvøkstur síðani umleið á sumri 2021.

Øktur livikostnaður tálmar eftirspurningin hjá húsarhaldunum. Hagtøl fyri kortnýtslu frároknað prísvøkstur vísa, at føroyingar keyptu minni av vørum og tænastum í seinna hálvári 2022 í mun til seinna hálvár 2021, ið allarhelst skyldast øktu prísirnar (reyða strikan, 2021, liggur omanfyri grønu strikuni, 2022, í mynd 2.7). Lítil munur er á kortnýtsluni higartil í 2023 (ljósabláa strikan) samanborið við fyrra hálvár 2022 (grøna strikan), ið bendir á, at nýtslan stórt sæð er óbroytt í 2023.

**Kortnýstla hjá føroyingum í Føroyum og uttanlands samanlagt, jan 19 til jul 23** **Mynd 2.7**




**Kelda:** Bank Nordik og Betri Banki. Hagtølini eru deflateraði við brúkaraprístalinum (egnar útrokningar).

Mynd 2.8 vísir smávísutalið. Nøgdirnar ið eru seldar av klæðum og skóm eru lækkaðar 14% í fyrsta ársfjórðingi 2023 í mun til sama ársfjórðing árið fyri, meðan nøgdirnar av matvørum eru lækkaðar 4% í sama tíðarskeiði. Í hesum tíðarskeiði eru matvørurnar annars dýrkaðar meira enn klæðir og skógvar; matvørur eru dýrkaðar við 13% meðan klæðir og skógvar eru dýrkaði við bert 2% í fyrsta ársfjórðingi 2023 í mun til sama tíðarskeið árið fyri[6]. Tøl fyri kortnýtsluna hjá føroyingum uttanlands vísa hinvegin, at nýtslan hjá húsarhaldunum í útlondum hevur verið eins stór á sumri 2023, sum í fjør, og tað bendir á, at húsarhaldini eru við gott mót hóast alt, sí fylgiskjal 1.

[5] Landsbanki Føroya, Fíggjarligt Støðufesti 1. ársfj. 2023.

[6] Hagstova Føroya, tíðindi 28. juni 2023.

**Smásøluvísital, 1.ársfjórðing 1995 til 1. ársfjórðing 2023. trendur í føstum prísum** **Mynd 2.8**




**Viðm.:** Uppgjørt í føstum prísum merkir at prísvøksturin er drigin frá. Á hendan hátt verður virðið í kr. fyri mongdina funnið. Trendurin lýsir rákið í máldu tølunum, reinsað fyri árstíðarfrávik og aðrar tilvildarligar broytingar. 1. ársfjórðingur 2005=100

**Kelda:** Hagstova Føroya

Innflutningurin av hálvdrúgvum nýtsluvørum (t.d. klæðir) og drúgvum nýtsluvørum (t.d. sjónvørp og bilar) hevur síðani endan av 2021 staðið í stað, sí mynd 2.9. Hetta bendir á, at nýtslan av hálvdrúgvum og ódrúgvum vørum er minkað í nøgdum, nú ið vørurnar, vit innflyta, eru vorðnar dýrari í prísi. Handilsvinnan sigur frá, at eftirspurningurin eftir teimum dýru merkjunum av ymsum innbúgvi er minkaður, men tey flestu lata væl at hóast alt. Bilasølan er minkað munandi og tað gevur ábendingar um at húsarhaldini eru blivin meira afturhaldin við at gera stór keyp. Innflutningurin av ódrúgvum vørum, sum eitt nú eru matvørur, er hinvegin øktur (mynd 2.9). Hetta merkir, at nýtslumynstrið hjá húsarhaldunum er broytt á tann hátt, at gerandisvørurnar fylla meira enn áður í samlaðu nýtsluni.

**Lønarinntøka og innfluttar nýstluvørur hjá húsarhaldum, jan-98 til jun-23** **Mynd 2.9**




**Kelda:** Hagstova Føroya og egnar útrokningar

Inflasjónin og øktu rentuútreiðslurnar hava fingið bankarnar at seta størri krøv til tiltøkupeningin tá biðið verður um sethúsalán, og tað ávirkar, hvussu nógv húsarhaldini kunnu bjóða uppá eini sethús. Meklarar greiða frá, at tað nú eru færri, ið bjóða uppá ognirnar, og at tað serliga eru fyrstuferðskeyparar, sum ikki fáa verið við. Harafturat er byggitilfarið dýrkað so mikið nógv, at fólk eru vorðin meir afturhaldin við at byggja nýtt ella at keypa sethús, sum krevja umvæling.

Meklarar siga frá, at sethúsini liggja longri tíð á sølulistanum áðrenn tey verða seld, og at tað er vorðið meira vanligt, at áhugaðir keyparar bjóða undir útboðsprísin, men at tey flestu húsini hóast alt fara til útboðsprísin. Í fyrsta ársfjórðingi 2023 var liggitíðin longri, men síðani er komið meira gongd aftur í sethúsamarknaðin. Í árunum 2019 – 2021 var ikki óvanligt, at sethúsini vóru seld, áðrenn tey náddu at koma á sølulistan, ella at boð fóru uppum útboðsprísin beinanvegin. Í dag er prísmunurin millum nýggj og gomul hús vorðin meira náttúruligur, tí eldri hús fara fyri ein lægri prís, enn tey nýggju sethúsini, greiða meklarar frá.

Mynd 2.10 vísir gongdina í sethúsaprísum fyri tíðarskeiðið 1985 til annan ársfjórðing 2023. Verður miðalprísurin í Havnini í fyrra hálvári 2023 samanborin við miðalprísin fyri alt árið 2022, er hann so at siga óbroyttur; hann er hækkaður við nærum 1%.

Í størru bygdunum var miðalprísurin á sethúsum 6,5% lægri í fyrra hálvári 2023 í mun til fyrra hálvár 2022, meðan sethúsaprísirnir í Tórshavn vóru 2% lægri, í smærru bygdunum 9% hægri, og í Sandoynni og Suðuroynni 12% lægri í fyrra hálvári 2023 samanborið við fyrra hálvár 2022. Neyðugt er at hava fyrivarni fyri prísbroytingunum í smærri bygdunum og í Suðuroy og Sandoy, tí har eru lutfalsliga fáar sølur, og tí kunnu einkultar sølur toga miðalprísin annan vegin.[7]

**Miðalprísir fyri sethús, 1985 til 1. hálvár 2023** **Mynd 2.10**




**Viðm.:** Tórshavn fevnir um miðstaðarøkið (Tórshavn, Hoyvík og Argir). Miðalprísurin árini 1985-2022 er heil ár. Miðalprísurin fyri 2023 er bert fyri 1. hálvár.

**Kelda:** BankNordik.

Treka útboðið av bústøðum hevur saman við stóra fólkavøkstrinum (sí mynd 2.3) og lágu rentunum seinastu mongu árini verið við til at trýsta sethúsaprísirnar upp; sethúsaprísirnir eru í fleiri ár á rað øktir munandi samanborið við inntøkurnar hjá húsarhaldunum, sí mynd 2.11. Bústaðarbyrðan[8] vaks í árunum 2015 – 2021 orsakað av hækkandi sethúsaprísum, tí í hesum tíðarskeiði vóru renturnar lágar og inflasjónin lág, meðan lønarinntøkurnar vuksu og eftirspurningurin eftir bústøðum var stórur. Síðani 2022 er bæði rentan og inflasjónin økt, og tað hevur økt bústaðarbyrðuna uppaftur meira.[9]

[7] Kelda: BankNordik.

[8] Bústaðarbyrðan er tann parturin av tøku inntøkuni, sum fer til at gjalda bústaðarlán.

[9] Betri Banki, tíðindi 10 mai 2023 og greitt verður eisini frá í ársfrágreiðing Landsbankans, 2022.

**Sethúsaprísir og tøk inntøka, 1998 til 1. hálvár 2023** **Mynd 2.11**




**Viðm.:** Sethúsaprísirnir umboða miðstaðarøkið. Nýggjastu hagtølini kunnu vera heft við óvissu. Realir sethúsaprísir eru deflateraðir við brúkaraprístalinum. Tøk inntøka er tøka inntøkan hjá persónligum skattgjaldarum fram til og við 2021. Vøksturin í tøku inntøkuni í 2022 og 1h2023 er meting Landsbankans; mett er út frá vøkstrinum í lønargjaldingum. 1h23 umboðar fyrsta hálvár 2023.
**Kelda:** Bank Nordik (sethúsaprísir), Hagstova Føroya (tøk inntøka; persónligir skattgjaldarar), Landsbanki Føroya (meting av tøku inntøkuni fyri 2022 og 1h2023).

Mangul á bústøðum er ein týðandi fløskuhálsur, sum kann forða fyri framhaldandi fólka- og búskaparvøkstri komandi árini. Búskaparráðið metir tað vera umráðandi at kommunur við stórum fólkavøkstri framskunda útstykkingar av grundstykkjum - serliga til bygging av smærri bústaðareindum, so bráfeingistørvurin skjótari verður nøktaður, og at landið somuleiðis ger sítt íkast við at byggja leigubústaðir. Í tíðarskeiðinum frá januar 2014 til desember 2022 er fólkatalið økt við umleið 6.000 persónum. Í sama tíðarskeiði eru umleið 1.600 nýggjar nýíbindingar í elkervið hjá SEV gjørdar, sum eitt met fyri nýggjar bústaðareindir. Er talið av persónum í hvørjum húski umleið 3 í miðal í Føroyum[10], svarar tað til ein tørv á 2.000 nýggj býlir, og sostatt er tað bert 80% av bústaðartørvinum, sum er nøktaður.

## Vinnan

Mynd 2.12 vísir samlaða vísitalið í føroyska búskapinum hjá bæði brúkarum og vinnu. Myndin vísir, at hóast húsarhaldini eru eitt vet bjartskygdari, er støðan ikki hin sama hjá vinnuni. Treystitalið er lækkað úr 17 í januar 2023 til 6 í juni 2023 og liggur nú undir langtíðarmiðalið. Ávísin fyri tilfeingisvinnuna er lækkaður munandi síðani seinastu kanning; hon boðar millum annað frá lægri eftirspurningi, viknaðum marknaðarluti, stórum goymslum av liðugtvørum og væntanum príslækkingum. Fiskaprísirnir á serliga botnfiski vóru sera høgir í 2022, men hava verið fallandi gjøgnum 2023. Harafturat kunnu politisku útmeldingarnar um broytingar í fiskivinnusamstarvinum við Russland og óvissurnar viðvíkjandi útflutninginum til Russlands hava havt sína ávirkan, tá ið umboðini fyri tilfeingisvinnuna svaraðu spurningunum í kanningini í juni 2023.

Handilsvinnan svarar í kanningini, at sølan tað seinasta árið hevur verið lægri enn frammanundan, men væntaða sølan komandi árið er kvinkað eitt vet uppeftir. Føroyingar hava skift yvir til bíligari gerandisvørur, sølan av stórum og dýrum innbúgvi er lækkað. Smásøluvísitalið[11] vísir samsvarandi, at húsarhaldini vegna príshækkingar á serliga matvørum, eru farin at eftirspyrja minni av eitt nú klæðum og skóm.

Í tænastuvinnuni væntast somuleiðis lægri eftirspurningur komandi árið. Ferðavinnan hevur latið væl at í juni og juli mánaði, men hetta summarið hevur verið meira óvist, tí ferðafólk hava bílagt í seinastu løtu.

[10] Sambært seinastu uppgerð hjá Hagstovu Føroya av húskjum (2020).
[11] Hagstova Føroya, tíðindi 28. juni 2023.

**Treystitalið fyri brúkarar og vinnuna, jan-07 til jun-2023** **Mynd 2.12**




**Viðm.:** Konjunkturbarometur. Samanvigaður ávísi frá 5 kanningum fyri brúkarar og 4 vinnubólkar. Brúkarar 20%, tilfeingisvinnur o.a. Ídnaður 40%, byggivinnan 5%, handilsvinnan 5% og tænastuvinnur 30%
**Kelda:** Hagstova Føroya.

Nærum øll kømurini á føroysku gistingarhúsunum vóru tó upptikin í juni mánaði og stórt virksemi er í flutningi av ferðafólki í 2023, bæði luftvegis (Atlantic Airways) og sjóvegis (Smyril Line). Sannlíkt eru ferðandi meira varin í ár orsakað av høgari inflasjión, men ferðavinnan væntar at tá tað kemur í rættlag aftur, so verður eftirspurningurin størri aftur og tí vóna tey eitt betri ár í 2024 enn í 2023.

Í byggivinnuni sæst ein lækking í vísitalinum, men ávísin fyri byggivinnuna er tó hægri, enn miðalið fyri seinastu 15 árini. Tað eru framvegis fleiri stórar verkætlanir í gongd hjá landi, kommunum og privatum fyritøkum, ið merkir, at stóru aktørarnir í byggivinnuni hava tryggjað arbeiði í minsta lagið 1,5 ár fram. Búskaparráðið hevur áður gjørt vart við, at tað er heldur óheppið at tað almenna, tað vil siga land og kommunur, leggja óneyðugt trýst á byggivinnuna við at seta í gongd stórar byggiverkætlanir í góðum tíðum, samstundis sum tað privata ger stórar íløgur. Hetta tí eftirspurningurin hjá tí almenna økir uppaftur meira um eftirspurningin eftir arbeiðsmegi í byggivinnuni, sum elvir til lønartrýst í byggivinnuni og harvið dýrkar byggiverkætlanirnar hjá bæði tí almenna og privata, umframt at upptaka arbeiðsmegi, ið annars kundi nøkta eftirspurningin hjá húsarhaldum.

**Konjunkturbarometrið fyri byggivinnu - avmarkingar í framleiðsluni, jun-6 til jun-23** **Mynd 2.13**




**Kelda:** Hagstova Føroya.

Mynd 2.13 vísir, hvat aktørarnir í byggivinnuni meta um avmarkingarnar í framleiðsluni. Í kanningini frá juni er grøna økið munandi størri, enn í seinastu kanning; byggivinnan metir sostatt, at mangul á arbeiðsmegi er størsta avmarkingin fyri framleiðsluna. Føroyar hava í longri tíð havt søguliga lágt arbeiðsloysi (sí mynd 2.3) og ein stór avbjóðing fyri búskapin er tí trot á arbeiðsmegi. Innan almennar tænastur merkja borgarar, longu nú avleiðingarnar av starvsfólkatrotinum; eitt nú tá foreldur ikki fáa ansað sínum børnum fulla tíð, og tá ellisheim mugu steingja stovur, tí teimum vanta starvsfólk. Tá ið bæði privata vinnan og tað almenna mangla arbeiðsmegi, er tað ikki skynsamt at hava serskipanir, ið geva skattligan fyrimun, og harvið eggja fólki til at arbeiða uttanlands. Búskaparráðið heldur, at serskipanirnar, sum geva skattligan fyrimun hjá millum annað handverkarum at arbeiða uttanlands, eiga at vera avtiknar. Tær eru ikki til gagns fyri føroyska samfelagið, tá ið tað er stórur eftirspurningur eftir skikkaði arbeiðsmegi í millum annað byggivinnuni í Føroyum, umframt at tað leggur trýst á lønirnar.

Starvsfólkatørvurin verður í løtuni í summum vinnum nøktaður við at innflyta arbeiðsmegi. Tað er serliga gistingarhús- og matstovuvinnan, umframt fiskavøruídnaðurin, sum nýta útlendska arbeiðsmegi, sí mynd 2.14. Tó so eru framvegis vinnur, millum annað byggivinnan, sum enn hava avbjóðingar við at fáa skikkaða arbeiðsmegi. Fleiri lond í Evropa hava somu demografisku avbjóðingar fyri framman, sum Føroyar, og mangla somuleiðis arbeiðsmegi. Tískil kann hugsast, at kappingin um útlendsku arbeiðsmegina einans verður harðari við tíðini.

**Útlendsk arbeiðsmegi býtt á vinnugreinar, jan-01 til jul-23** **Mynd 2.14**




**Viðm.:** Útlendska arbeiðsmegin er roknað sum leypandi 12 mðr. Miðal
**Kelda:** Hagstova Føroya og Landsbanki Føroya.

Demografiska gongdin í Føroyum við veksandi tali av eldri fólki hevur við sær, at tørvurin á millum annað eldrarøkt økist í framtíðini. Hetta fer at krevja ein enn størri starvsfólkahóp. Búskaparráðið metti á vári 2021 at tørvur fer at verða á 1.000 fleiri starvsfólki innan eldrarøkt, áleið 100 eyka sjúkrarøktarfrøðingum til sjúkrahúsverkið, og nærum 800 eyka starvsfólkum til almannaverkið.[12] Sostatt er líkt til, at trotið á arbeiðsmegi verður ein trupulleiki mong ár fram. Búskaparráðið metir, at tað er neyðugt at politiska skipanin fremur nýskipanir, sum økja um arbeiðsútboðið hjá føroyingum, og avtaka serskipanir, ið minka um arbeiðsútboðið í Føroyum. Í løtuni liggur í kortunum at stytta arbeiðsvikuna. Stytt arbeiðsvika vil minka um arbeiðsútboðið. Lægri arbeiðsútboð kann viðføra, at tað verður alsamt torførari at veita tær somu vælferðartænasturnar vit hava í dag, tá talið av teimum, sum hava tørv á hesum vælferðartænastum hækkar. Í síðsta enda er avleiðingin av varandi starvsfólkatroti, at framleiðslan í landinum, og harvið vælferðin, verður minni, enn hon kundi verið. Politiska skipanin átti hinvegin at framt tiltøk, ið eru við til at økja um arbeiðsútboðið í Føroyum, eitt nú við at hækka pensjónsaldurin.

[12] Evnisfrágreiðing Búskaparráðsins um vælferðarøkið, várið 2021.

**Nettotilflyting býtt á danskar og ikki danskar ríkisborgarar** **Mynd 2.15**




**Kelda:** Hagstova Føroya og egnar útrokningar

Síðani umleið 2014 er tað bæði tilflytingin av donskum og ikki donskum ríkisborgarum, sum hevur givið íkast til samlaðu nettotilflytingina til Føroya, men hendan gongdin vendi í 2021, sí mynd 2.15. Danskir ríkisborgarar eru einamest føroyingar, sum flyta heimaftur. Ikki danskir ríkisborgarar eru allir aðrir útlendingar sum flyta til Føroya (fyriuttan danir). Síðani 2022 hevur nettotilflytingin av ikki-donskum ríkisborgarum verið áleið 600 fólk, meðan tað hevur verið ein netto*fráflyting* av donskum ríkisborgarum á umleið 150 fólk. Tað eru sostatt útlendingar (í stóran mun útlendsk arbeiðsmegi) og ikki heimaftur flytandi føroyingar, sum er orsøk til positivu nettotilflytningina til Føroya í 2022. Sum tað sæst á myndini, er talan um heilt nýggja gongd, har stóri vøksturin í talinum av tilflytandi útlendingum óiva skyldast broyttu skipanini við fast-track.

# 3 Almenn nýtsla og íløgur

## Úrslitið á almennu roknskapunum

Mynd 3.1 gevur eitt yvirlit yvir roknskaparúrslit landskassans; RLÚ 1[13] og úrslitið í prosent av BTÚ. Úrslitið á fíggjarlógini fyri 2023 metir Búskaparráðið verður -30 mió. kr. Metingin tekur støði í seinasta uppskoti til fíggjarlóg 2023, sum vísir eitt avlop á umleið 150 mió. kr. Búskaparráðið metir tó, at av støðlingunum[14] av íløgum á 300 mió. kr. vera nýttar 150 mió. kr. í 2023. Harafturat er metingin hjá fíggjarmálaráðnum í løtuni, at eykajáttanir í 2023 vera fyri um 30 mió. kr. til ymsar rakstrarútreiðslur. Harvið verður úrslitið -30 mió. kr. í 2023. Fyri fíggjarárið 2024 hevur Búskaparráðið framskrivað landskassans útreiðslu- og inntøkusíðu við 2-5% út frá miðalvøkstrinum tey seinastu árini hjá einstøku postunum. Útreiðslur til lønir eru mettar at veksa við 6% í 2024 í mun til 2023. Tað gevur eitt hall á um 150 mió. kr., sum er í tráð við játtanarkarmarnar. So er metingin eisini at landið fer at nýta 50 mió. kr. meira enn ætlað til íløgur (at støðlingarnar minka við 50 mió. kr.) og úrslitið verður tí mett til -202 mió. kr. í 2024.

**Landskassaúrslitið RLÚ, vanligir postar, 1998-2024** **Mynd 3.1**




**Viðm.:** RLÚ í leypandi prísum og sum brøkur av BTÚ. 2023-2024 eru metingar.

**Kelda:** Gjaldstovan, Fíggjarmálaráðið og Búskaparráðið.

Tað er lítil ivi í, at hall á fíggjarlógini í 2023 og 2024 ikki er nóg væl frágingið, tá ið føroyski búskapurin framvegis er í vøkstri við metlágum arbeiðsloysi og inntøkuvøkstri í landskassanum. Hetta bæði sæð í mun til konjunkturstøðuna í løtuni og í mun til veksandi avbjóðingina við haldførinum, tá vit fara at gerast munandi fleiri eldri fólk í mun til tey í arbeiðsførum aldri – í so máta átti tað verið stór avlop í 2023 og 2024. Neyðugt er at landsstýrið ger langtíðarætlanir fyri fíggjarligu gongdina, ikki bara fyri landskassan, men eisini fyri kommunurnar, tí stórar avbjóðingar eru fyri framman, nú ið eldraøkið liggur hjá kommunum. Givið er at tað verður neyðugt við fíggjarligum nýskipanum.

[13] RLÚ er landskassans Rakstrar-, Løgu- og Útlánsúrslit, sum verður býtt sundur í RLÚ 1 (Vanligir postar) og RLÚ 2 (Vanligir og óvanligir postar). Óvanligir postar eru óvanligar inntøkur og útreiðslur, flyting í Búskapargrunn og rentujavningar. Óvanligir postar hava td. verið: Í 2007 fekk landsstýrið 1,3 mia. kr. frá sølu av partabrøvum í BankNordik. Í 2008 lænti landsstýrið íslendsku stjórnini 300 mió. kr., sum vórðu afturgoldnar í 2012. Í 2013 inntøkuførdi landsstýrið eginogn Landsbankans (160 mió. kr.) við avtøkuna av bankanum. Í 2018 inntøkuførdi landsstýrið niðurskriving av láni frá danska statinum (500 mió. kr.) sambært avtalu frá 1998. Í 2021 avtók landskassin fíggingargrunnin, sum gav eina inntøku á umleið 60 mió. kr.

[14] Støðlingar eru íløgur, sum eru játtaðar í undanfarnu árunum, sum ikki eru framdar enn. Hesar íløgur kunnu koma afturat rakstrinum í sjálvum árinum.

## Ogn og skuld hjá almennari fyrisiting og tænastu

Mynd 3.2 vísir gongdina í fíggjarligu nettoognini hjá landskassanum árini 1998-2024 (uttan útbúnað).[15] Eftir altjóða leisti fyri hagtalsuppgerð av skuld hjá fyritøkum undir almennum ræði, er veðhaldsskylda fyri undirsjóvartunlar roknað uppí hjá feløgum, sum ikki eru sjálvberandi. Skuldin hjá P/F Eystur – og Sandoyartunlinum er tískil roknað uppí hjá landskassanum.

Landskassin er mettir at hava eina nettoskuld á góðar 2,8 mia. kr. í 2023 og góðar 3 mia. kr. í 2024. Landskassin hevur havt nettoskuld øll árini undantikið í 2007, tá skuldin einans var 243 mió. kr. Í tíðarskeiðinum 2008 til 2015 økti landsstýrið skuldina við samanlagt 2,8 mia. kr. og av hesi orsøk lækkaði Moody's kredittmetingina frá Aa2 til Aa3 við negativum útlitum. Hetta merkir, at tað ikki var nóg mikið, at nettoognin hjá landskassanum var nærum null í 2007 beint undan fíggjarkreppuna fyri at megna tey komandi árini við halli, uttan at missa eitt stig í kredittmetingini. Fíggjarstøða landskassans er verri í dag, enn hon var beint áðrenn fíggjarkreppan rakti, hóast føroyski búskapurin hevur havt stóra framgongd seinastu 10 árini. Nettoogn landskassans eigur at vera so mikið stór, at kredittvirði er til at kunna lána í eini komandi afturgongd. Fyri at økja um nettoogn landskassans krevst yvirskot á fíggjarlógini.

**Nettoogn/skuld (uttan útbúnað) hjá landskassanum** **Mynd 3.2**




**Kelda:** Gjaldstovan og Búskaparráðið, 2023 - 2024 eru egnar metingar.

---

[15] Ogn og skuld hjá almenna geiranum eru mett tøl. Skyldur landskassans fyri tænastumannapensjónir og rentugaranti til P/F Lív eru ikki tikin við sum skuld. Heldur ikki er virðið á livandi tilfeingi, sum kundi verið tikið inn við brúksgjaldi, tikið við sum ogn. Veðhaldsskylda landkassans fyri undirsjóvartunlar er roknað uppí hjá feløgum, sum ikki eru sjálvberandi, tað vil siga at skuldin hjá P/F Eystur – og Sandoyartunlinum er roknað uppí. Sama er skuldin hjá Vága- og Norðoyatunlinum, og uppgjørt er eftir hesum leisti aftur til 1998. Veðhaldsskyldur vegna tryggingaravtalu hjá Føroya Lívstrygging er gjørd upp til 653 mió. kr. í ársroknskapinum fyri 2022. Skyldan fellur tá rentan hækkar. Nettoskylda landskassans fyri tænastumannapensjónir er 4.163 mió. kr. Keldur: Føroya Gjaldsstova, landskassaroknskapurin fyri fíggjarárið 2022, s. 248 og ársroknskapurin hjá Lív 2022.

## Nýtslan hjá almennari fyrisiting og tænastu

Mynd 3.3 vísir gongd og vøkstur í nýtsluni hjá almennari fyrisiting og tænastu, sum uppgjørt í tjóðarroknskapinum. Nýtsluútreiðslur hjá almennari fyrisiting og tænastu fevna um nýtsluútreiðslur hjá landi, kommunum, sosialum grunnum og ríki, men ikki fyritøkum undir almennum ræði. Tølini fyri 2023-2024 byggja á metingar[16].

**Almennar nýtsluútreiðslur í mió. kr. og árligur %-vøkstur, 2000-2024** **Mynd 3.3**




**Kelda:** Uppgerð hjá Hagstovu Føroya árini 2000-2022, 2023-2024 eru egnar metingar.

Árini 2018-2022 veksur almenna nýtslan um 5% árliga, sum er ein stórur vøkstur í hákonjunkturi. Vøksturin verður mettur at vera 6% í 2023 og 5% í 2024. Tað eru í størsta mun lønarútreiðslur á vælferðaøkinum, t.d. í heilsu- og almannaverkinum hjá landinum, sum økjast, ið gera seg galdandi fyri árini 2023 - 2024. Lønargjaldingar eru eisini mettar at økjast hjá kommununum hesi bæði árini, sum millum annað røkja eldraøkið, og somuleiðis veksa útreiðslurnar til fólkapensjónur orsakað av fleiri pensjónistum. Broytta lógin um javningarprosent til almannaveitingar merkir, at útreiðslurnar til fólkapensjón vaksa í 2023 og 2024 í mun til í 2022 tí pensjónurnar verða javnaðar við prís- og lønarvøkstri. Javningarprosentið verður tó ikki hægri, enn hvat lønarsamráðingarnar náa fram til av lønarvøkstri fyri alment sett starvsfólk. Javningarprosentið er sett til 1,25% í 2023 og er fyribils mett til 3,8% í 2024.

[16] Tjóðarroknskapurin fyri almenna geiran byggir á almennar roknskapir, m.a. landsroknskapin og kommunuroknskapir og roknskapir fyri summar almennar grunnar og stovnar, sum ikki eru á fíggjarlógini. Bólkingar í hesum roknskapum eru ikki altíð samanfallandi við bólkingar í tjóðarroknskapinum, og eitt ávíst fyrivarni krevst tí í brúki av tølunum.

## Íløgur almenna geirans

Mynd 3.4 vísir íløguútreiðslurnar, sum eru undir almennum ræði, tað vil siga hjá landi, kommunum, sosialum grunnum og ríki, umframt fyritøkum undir almennum ræði undir einum. Talan er um íløgur samsvarandi tjóðarroknskaparuppgerð og ikki roknskaparuppgerð. Tjóðarroknskaparligu íløgurnar eru størri enn roknskaparligu íløgurnar; m.a. er alt Landsverk og viðlíkahald, herundir keyp av útbúnaði, sum eru rakstrarkostnaðir í landskassaroknskapinum, roknað sum íløgur í tjóðarroknskapinum.

**Íløguútreiðslur undir almennum ræði í mió. kr. árini 2003 til 2024** **Mynd 3.4**




**Kelda:** Uppgerð hjá Hagstovu Føroya árini 2003-2021 fyri land og kommunur og íløgur hjá marknaðarframleiðandi fyritøkum undir almennum ræði. 2022-2024 eru egnar metingar fyri allar almennar íløgur.

Íløguvirksemið veksur eitt vet hjá kommununum í 2023 og 2024. Íløgurnar hjá landinum eru størri í 2023 enn í 2022, nú ið bygging av bæði Fámjinstunlinum, tunlarnir norður um fjall, og vegurin til Eysturoyartunnilin eru í gerð. Burturav mettum støðlingum á 300 mió. kr. í uppskoti til fíggjarlóg 2023 væntar Búskaparráðið, at 150 mió. kr. verða brúktar í ár. Sandoyartunnilin væntast at verða liðugur við endan av 2023 og millum annað tí eru íløgurnar hjá landinum lægri í 2024, enn í 2023.

Tað er umráðandi, at tað almenna undir einum strembar eftir eini støðugari gongd í almennum íløgum fyri at stabilisera gongdina í búskapinum. Sum myndin vísir, hevur tað ikki gingið væl at halda eina javna íløgugongd. Bæði land og kommunur hava tørv á miðvísari stýring og samskipan av íløgum, eins og tørvur er fyri samskipan av íløguvirksemið hjá fyritøkum undir almennum ræði. Tað hevði verið skynsamt, um politiska skipanin framdi eina ítøkiliga íløguætlan hjá øllum almenna geiranum undir einum. Hetta merkir samstundis, at politiska skipanin má raðfesta millum allar almennu íløgurnar, ið liggja fyri framman. Vaksandi talið av eldri er ein avbjóðing fyri fíggjarpolitiska haldførið í føroyska búskapinum, og neyðugt at gera nýskipanir og er at seta bygging av bústaðareindum í verk, ið effektiviserar raksturin av eldraøkinum. Ein avleiðing, av verandi fíggjarpolitikki, kann vera at hettar ættarliðið kemur at binda komandi ættarlið orsakað av manglandi haldføri í fíggjarpolitikkinum og skuld.

# 4 Nettoútflutningur

## Handilsjavni

Mynd 4.1 vísir gongdina í handilsjavnanum sum leypandi 12 mánaða samanlegging. Handilsjavnin er útflutningurin av vørum minus innflutningin av vørum, við øðrum orðum uttanlandshandil av vørum. Handilsjavnin var 597 mió. kr. í juni 2023, meðan hann uttan skip og flogfør var 1.607 mió. kr.

**Handilsjavnin, jan-94 til jun-23** **Mynd 4.1**




**Viðm.:** Leypandi 12-mánaðar samanlegging
**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í útflutningstølum hjá Hagstovu Føroya.

Mynd 4.2 vísir, at útflutningurin framvegis er øktur í 2023. Í 2022 vaks útflutningsvirðið munandi vegna stórum prísvøkstri á botnfiski og alifiski, og hóast innflutningsprísirnir eisini hækkaðu í 2022, var avlop á handilsjavnanum. Útlitini fyri útflutningin í 2023 er millum annað merkt av øktari svartkjaftakvotu og størri útflutningi av fiskamjøli. Laksaprísirnir vóru høgir í fyrru hálvu av 2023, men væntast at lækka aftur í seinnu helvt av 2023, meðan tøkunøgdin av alifiski verður eitt vet minni í 2023, enn í 2022. Heildarkvotan fyri makrel og sild er lækkað í 2023, men tað hevur gingist væl at fiska makrelin higartil í ár, og summi skip fiska harafturat burturav felagskvotuni, sum er flutt yvirum ár frá 2022[17]. Tí verður væntandi meir makrelur fiskaður í 2023, hóast heildarkvotan er lækkað eitt vet í mun til 2022. Nógvur makrelur er higartil í 2023 landaður til ídnað heldur enn til matna, og tað hevur haft við sær, at skipini hava kunna gjørt longri túrar. Svartkjaftakvotan er økt munandi í 2023 í mun til 2022. Tað merkir, at nøgdin av útfluttum fiskamjøli veksur, umframt at nøgdin av svartkjafti útflutt sum rávøra økist, tí stórur partur av øktu kvotuni verður avreidd uttanlands. Av toski verður minni útflutt vegna lægri kvotu í Barentshavinum, tó so hevur prísurin hildið sær fyrra hálvár 2023.

Í mynd 4.2 sæst somuleiðis, at innflutningurin vaks munandi í 2022. Í 2022 vaks innflutningurin serliga av brennievni, tí oljuprísurin vaks nógv. Í fyrra hálvári 2023 er innflutningurin av brennievni hinvegin fallin, tí oljuprísurin er lækkaður hesar fyrstu 6 mánaðirnar av 2023. Innflutningur av 'rávøru til fiskavirking', ið serliga er toskur og makrelur, er vaksin munandi. Harafturat er innflutningurin av alifóðri vaksin[18]. Innflutningurin í fyrra hálvári 2023 er samanumtikið á støði við innflutningin í fyrra hálvári 2022.

[17] 55.000 tons av makrelkvotu, ið ikki bleiv fiskað í 2022, er flutt til 2023 sum felagskvota við hámarki hjá hvørjum fiskifari á 6.000 tons.
[18] Hagstova Føroya, tíðindi 18. August 2023.

**Inn- og útflutningur av vørum(uttan skip og flogfør), jan-94 til jun-23** **Mynd 4.2**




**Viðm.:** Leypandi 12-mánaðar samanlegging
**Kelda:** Hagstova Føroya

## Fiskavøruútflutningur

Mynd 4.3 lýsir søguligu gongdina í útflutningsvirðinum av fiskavørum fyri høvuðsbólkarnar alifiskur, uppsjóvarfiskur og botnfiskur og onnur fiskasløg, ið tilsamans so at siga fevna um allan føroyskan vøruútflutning. Alifiskur fevnir um laks og síl, men nærum eingi síl verða útflutt í dag. Uppsjóvarfiskur fevnir um makrel, sild og svartkjaft, og harumframt er fiskamjøl lagt afturat hesum bólki. Botnfiskur og onnur fiskasløg fevna um tosk, hýsu, upsa, svartkalva, gulllaks, longu, brosmu, rækju o.a. Botnfiskurin hevur havt sera stóran týdning fyri útflutningin langt aftur í tíðina, men hevur ikki eins stóran týdning í dag. Í 2012 vóru allir tríggir vørubólkar nøkulunda javnt stórir í støðd, tá tað snýr seg um útflutningsvirði. Síðani tá er útflutningsvirðið av alifiski tvífaldað, og stavar hetta bæði frá prísvøkstri og vøkstri í nøgd.

**Fiskavøruútflutningur, jan-94 til jun-23** **Mynd 4.3**




**Viðm.:** Leypandi 12-mánaðar samanlegging. Virðið á svartkjaftinum, sum er landaður uttanlands fyrra hálvár 2023, er ikki við í myndini.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

# Laksur

Í 2023 er tøkunøgdin av laksi mett at lækka eitt lítið vet í mun til 2022. Tøkunøgdin inntil víðari í ár er lægri, enn sama tíðarskeið í fjør, meðan biomassin í ringunum (laksurin í ringunum) er størri enn sama tíðarskeið í fjør. Smoltgoymslan á landi bendir á, at tøkunøgdin verður hægri í 2024 enn 2023, men enn er torført at meta um, hvat samlaða tøkunøgdin verður í 2024. Alivinnan boðar frá ætlanum um at økja framleiðsluna munandi komandi 5 árini, og tað fer at merkja útflutningin av laksi frameftir.

**Tøka (livandi vekt) í alivinnuni, 1998 til 2023** **Mynd 4.4**




**Kelda:** Avrik sp/f. 2023 er ein meting

Laksaprísurin hevur verið høgur fyrsta hálvár í 2023. Sambært metingarstovninum Fishpool, væntast miðal heimsprísurin á laksi at lækka aftur í seinnu helvt av 2023, soleiðis at hann verður áleið tað sama í miðal í 2023, sum í 2022. Laksaprísurin væntast harafturat at lækka eitt vet í 2024.

**Spotprísur á laksi (DKK/kg) hvørja viku, jan-04 til aug-23** **Mynd 4.5**




**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í laksaprísi (í NOK) frá fishpool.eu og gjaldoyrakursi frá Danmarks Nationalbank.

## Uppsjóvarfiskur

Talva 4.1 vísir kvoturnar fyri uppsjóvarfisk 2023 sammett við 2022. Sambært talvuni lækkar makrelkvotan 2%, svartkjaftakvotan hækkar 81% og norðhavssildakvotan lækkar 15% í 2023 í mun til árið fyri. Hetta samsvarar við broytingina í tilmælta TAC hjá ICES fyri hesi fiskasløg. Tó so fiska strandalondini framvegis samanlagt meir enn tilmælta TAC.

**Heildarkvotur fyri uppsjóvarfisk árini 2022 og 2023** **Talva 4.1**

| *Tons* | Makrelur | Svartkjaftur | Norðhavssild |
|---|---|---|---|
| 2022 | 155.804 | 267.431 | 131.989 |
| 2023 | 153.285 | 483.076 | 112.713 |
| Broyting | -2% | 81% | -15% |

**Kelda:** Felagið Nótaskip.

Ovveiðan av makreli hevur verið um 40%, meðan eingin semja hevur verið millum strandalondini. Hetta hevur higartil borið til, tí tilgongdin av makreli hevur verið so mikið góð, men hetta er ikki haldgott í longdini, tí stovnsmetingarnar siga, at stovnsstøddin er niðurgangandi. Ovveiðan týðir á, at ein minking er í væntu, men enn er makrelstovnurin omanfyri markið fyri, nær tað er neyðugt at vísa varsemi, og tí fer tað væntandi ikki at síggjast nøkur stórvegis broyting í 2024 í mun til 2023. Heildarkvotan fyri sild lækkar 15% í 2023. Norðhavssildastovnurin er verri fyri, tískil lækkar sildakvotan í 2023, og fer hon væntandi eisini at lækka í 2024.

Heildarkvotan fyri makrel minkar eitt vet í 2023. Tó eru 55.000 tons, sum ikki blivu fiskaði í 2022, býtt út sum felagskvota í 2023, við hámarki á 6.000 tons fyri hvørt fiskifar. Vinnan metur at fitt av kvotuni, ið er flutt yvir frá 2022, verður fiskað í 2023. Tað hevur við sær, at helst meir makrelur verður fiskaður í 2023, enn í 2022. Útflutningurin av makreli kemur ikki at økjast tilsvarandi økta fiskaríinum, tí stórur partur er landaður hjá Havsbrún, ið framleiðir fiskamjøl og fóður. Útflutningurin til Russlands tók aftur rættiliga dik á seg um ársskiftið. Fyrra hálvár í 2023 hevur útflutningur av makreli verið eitt vet hægri, enn sama tíðarskeið í fjør, og tað kemur av, at tað er selt av goymslum, sum vóru fiskaðar í fjør. Harumframt hava pelagisku virkini keypt onkra last av makreli frá útlendskum skipum, eins og innflutningstølini vísa. Eftirspurningurin eftir makreli er tó lítil í løtuni og tískil metur vinnan, at minni av makreli til matna verður útfluttur seinna hálvár 2023 í mun til sama tíðarskeið 2022.

Uppsjóvarvirkini hava havt stongt í nakrar vikur í summar, og hevur hetta havt við sær, at skip eru sloppin at landa uttanlands. Tað, at ein partur av makrelinum er landaður uttanlands, førur við sær, at metta útflutta nøgdin av makreli í 2023 verður áleið hin sama sum í 2022, hóast minni væntandi verður útflutt av virkaðum makreli. Mett verður, at áleið sama nøgd av makreli verður útflutt í 2024 sum í 2023.

Høgir mjøl- og lýsiprísir hava havt við sær, at virkini sum framleiða fiskamjøl og lýsi, hava kunna bjóðað kappingarførar prísir fyri makrelin, tá ið hann var uppá tað feitasta. Ein av orsøkunum til høga lýsiprísin er, at Peru, ið er størsti útflytari av fiskamjøli í heiminum, vegna El Niño onga fiskakvotu hevur í løtuni. Mett verður, at størri partur av makrelinum komandi ár verður landaður hjá uppsjóvarvirkjunum og tískil verður útfluttur sum makrelur til matna, ið økir um útflutningsvirðið á makreli fyri 2024.

Svartkjaftakvotan er hækkað heili 81% í 2023 í mun til 2022, og er sostatt 483.076 tons. Meginparturin av kvotuni er fiskað fyrsta hálvár og í stóran mun landað hjá Havsbrún. Orka hevur ikki verið í Føroyum at taka í móti øllum svartkjaftinum, og tískil eru nærum 122.000 tons landaði uttanlands. Økta svartkjaftakvotan sæst aftur í øktum nøgdum av útfluttum fiskamjøli og svartkjafti. Í miðal er útflutningurin av svartkjafti seldur til ein lægri eindarprís, enn í 2022, tí størsti parturin av útflutta svartkjaftinum er landaður uttanlands, og tískil seldur til avreiðingarvirði.

**Eindarprísur fyri makrel, sild, fiskamjøl og fóður í útflutninginum, jan-95 til jun-23** **Mynd 4.6**




**Viðm.:** Eindarprísurin er roknaður sum leypandi 12-mánaðar miðal. Næstan allur svartkjaftur verður kvørnaður til fiskamjøl.

Mynd 4.6 vísir gongdina í eindarprísunum fyri makrel, sild, umframt fiskamjøl og fóður. Prísvøksturin á fiskamjøli og fóðri var stórur í 2022. Prísurin hevur somuleiðis verið góður higartil í 2023 og heldur væntandi støðið árið út, og møguliga inn í komandi ár. Umstøðurnar við El Niño hava ført við sær, at serliga lýsiprísurin er hækkaður og mjølprísurin hevur somuleiðis verið høgur. Tað er óvist hvussu leingi El Niño verður, og kemur hetta at hava stóran týdning fyri, hvat prísurin verður í 2024. Útlitini í alivinnuni eru harafturat góð í 2024, og tað kann merkja, at prísurin á fiskamjøli og fóðri kemur at halda sær í 2024.

Prísurin á sild heldur sær væntandi í 2023. Tað er serliga sild til ídnað, ið heldur prísinum uppi. Sild er væl egnað til lýsi. Tá ið prísurin á fiskalýsi er sera høgur í løtuni, merkir tað, at tey ið framleiða sildina til ídnað, kunnu bjóða kappingarførar prísir í kappingini við tey, sum framleiða sildina til matna.

Á vári 2022 minkaði útflutningurin av uppsjóvarfiski til Russland í nærum einki. Tó so byrjaði útflutningurin til Russland aftur at veksa munandi um ársskiftið 2023, og var útflutningurin fyrra hálvártil Russland aftur á sama støði, sum áðrenn februar 2022[19]. Metingarnar fyri útflutningin í hesi frágreiðing taka útgangsstøði í, at støðan í mun til Russland er óbroytt. Tað vil siga, at tað framvegis er møguligt at útflyta til Russland í 2023 og 2024. Um útflutningurin til Russland steðgar, kann væntast at prísurin á serliga sild og makreli lækkar.

[19] Hagstova Føroya, tíðindi 16. mai 2023.

## Botnfiskur

Mynd 4.7 vísir, at eindarprísurin fyri botnfisk hækkaði serstakliga nógv í 2022. Prísurin á toski hevur verið góður fyrra hálvár 2023. Vinnan boðar frá, at nógvur russiskur toskur er á evropeiska marknaðinum, sum hevur verið høvðustoskamarknaður hjá føroyingum, og hetta hevur verið við til at trýsta prísin niður í summar. Líkt er til, at toskaprísurin verður lægri seinna hálvár, enn fyrra hálvár 2023. Toskaprísurin heldur sær væntandi komandi ár, tí at toskakvoturnar í Íslandi og Barentshavinum ikki eru serliga stórar. Hýsuprísurin er fallin í fyrra hálvári 2023. Hetta skyldast millum annað tað, at hýsustovnurin er í vøkstri, men marknaðurin er avmarkaður.

**Eindarprísur fyri botnfisk í útflutninginum, jan-95 til jun-23** **Mynd 4.7**




**Viðm.:** Eindarprísurin er roknaður sum leypandi 12 mðr. miðal.

Fiskiskapurin eftir upsa hevur í fleiri ár verið vánaligur. Fyrra hálvár í 2023 hevur verið fiskað áleið 30% minni enn sama tíðarskeið í fjør, ið bendir á, at veiðan fyri árið verður væl minni, enn í 2022. Upsaprísurin var sera høgur fyrra hálvár 2023, men er síðani byrjaður at fella. Væntandi verður miðalprísurin fyri 2023 eitt vet hægri, enn fyri 2022. Fallandi upsaprísurin í løtuni hongur saman við, at stórar goymslur av alaska pollock trekkja prísin á alaska pollock niður, sum smittar av á upsaprísin.

# 5 Burðardygg umsiting av tilfeingi

Búskaparráðið talar fyri, at tilfeingisgjald verður tikið inn fyri tey náttúrutilfeingi, sum Føroyar ráða yvir. Verður tilfeingisgjald ikki tikið inn av tilfeingisrentuni, verður trýstið fyri at sleppa framat at fáa part í veiðirættindum sera stórt, tá raksturin hjá verandi fyritøkum gongur væl, og vandin er tí stórur fyri at fáa yvirkapasitet, har tilfeingisrentan verður til rakstrarkostnað og fiskivinnan lítið produktiv. Hetta er millum annað tað, vit síggja í heimaflotanum. Tað er breið semja um, at har sum tilfeingisrenta, vegna framíhjárættindini, er í vinnuni, er tað rímiligt at goldið verður fyri henda framíhjárætt. Endamálið við hesum politikki eigur at vera at fáa sum mest burturúr búskaparliga í longdini. Harundir er endamálið eisini at optimera tilfeingisrentuna á teimum náttúrutilfeingjum, sum Føroyar ráða yvir, og at optimera føroyska framleiðslu og produktivitetsvøkstur í øllum búskapinum. Ein politikkur, sum byggir á hesar fortreytir, kann og eigur at verða hildin í longdini, og eigur ikki at skifta eftir fíggingartørvi hjá landskassanum.

Heimaflotin er komin til eitt markamót, har tað er neyðugt at gera eina haldgóða ætlan fyri, hvussu heimaflotin gerst burðardyggur, so hann gevur íkast til búskapin. Eftir ringa standinum á botnfiskastovnunum at døma, hevur umsitingin av botnfiskastovnunum ikki roynst væl. Spurningurin er um ov høgt veiðitrýst hevur elvt til ovurfisking, og yvirkapasiteturin í heimaflotanum tískil er orsøk til, at tilfeingisrentan er vorðin til rakstrarkostnað.

Sambært stovnsmetingum hjá Havstovuni hevur toskastovnurin verið lítil í eini 16 ár (síðan 2004), sí mynd 5.1, og útlitini hjá toskastovninum eru nú so mikið vánalig, at havróknarstovnurin ICES hevur mælt til, at eingin toskur verður fiskaður á føroyska landgrunninum í 2023 og 2024. Havstovan mælir tí til eina skerjing av fiskidøgunum á 5% sambært umsitingarætlanini.

Serliga toska- og hýsustovnarnir undir Føroyum eru staðbundnir stovnar, og tað sum hvørt ár verður tikið úr stovnunum, hevur sjálvsagt ávirkan á støddina á stovnunum. Tí hevur veiðitrýstið týdning fyri støddina á tí varandi ískoyti, sum fiskastovnarnir kunnu geva føroyska búskapinum. Endamálið við at avmarka veiðitrýstið er fyrst og fremst, at fiskastovnarnir skulu geva størst møguligt búskaparligt avkast til samfelagið í langa høpinum.

**Toskur í føroyskum havøki: samlaður stovnur, veiða og veiðitrýst, 1959-2025** **Mynd 5.1**




**Viðm.:** Fyri 2023 - 2025 er talan um metingar hjá ICES og Havstovuni.
**Kelda:** ICES, Havstovan og egnar útrokningar.

Búskaparráðið ger enn einaferð vart við, at verandi skipan í umsitingarætlanini ikki er nóg munagóð, tá ið talið av fiskidøgum einans kann flytast 5% hvønn vegin. Skulu okkara fiskastovnar umsitast burðardygt, har atlit verður tikið til fiskastovnar, sum eru illa fyri, eigur skipanin at geva møguleiki fyri størri átøkum, enn bert at kunna flyta talið av fiskidøgum 5% hvønn vegin. Búskaparráðið mælir eisini til, at óbrúktir fiskidagar verða tiknir úr skipanini, so veiðitrýstið ikki brádliga kann økjast, tá fiskiskapurin

tykist at batna. Harumframt eigur at verða umhugsað, um ikki tað hevði verið meira skynsamt at havt kvotur ístaðin fyri fiskidagar, so mark kann setast fyri nøgdina, ið verður fiskað.

Vánaliga støðan í heimaflotanum við ringu útlitunum frameftir, hevur harafturat fingið politisku skipanina til at fara inn aftur á gamlar slóðir, ið vit frá royndum vita ikki er haldbart, við at veita stuðul til heimaflotan. Stuðulin verður ikki veittur sum reiður peningur, men tað kundi hann tað sama verið. Skipini, og í einkultum førum eisini fiskavirkir, fáa útlutað makrelkvotur, sum tey ikki eru før fyri at fiska. Síðan selja hesi fiskirættin til onnur at fiska. Heldur enn at leggja dent á at umsita fiskatilfeingið burðardygt og effektivt, hevur politiska skipanin valt at veita stuðul sum makrelkvotur til skip, ið ikki eru útgjørd at fiska makrel. Stuðulin hevur við sær at heimaflotin heldur áfram við at verða størri, enn tað sum er búskaparliga skilagott. Fiskavirkir, sum hava fiskifør á landgrunninum, fáa eisini óbeinleiðis stuðul, og hetta er samstundis við at skeikla kappingina millum fiskavirkini á landi. Búskaparráðið er av tí fatan, at slíkar skipanir tálma ella taka burtur insitamentið hjá vinnuni at gerast meira produktiv og harvið til produktivitetsvøkstur í føroyska búskapinum.

Pelagiska vinnan hevur megnað at konsolidera seg, soleiðis at vinnan hevur fiskað pelagiska fiskin so effektivt sum gjørligt. Fyri at varðveita produktivitetin, og harvið búskaparliga vøksturin, er tað grundleggjandi, at tað verður framleitt so effektivt sum møguligt. Tað merkir at flotin ikki eigur at vera størri, enn neyðugt og at tað ikki er skynsamt at taka kvotur burturav hjá skipum, sum longu eru etableraði og geva til nýggjar aktørar, so fleiri skip leggjast afturat flotanum. Umframt betri produktivitet, merkja færri skip eisini at útlátið av $CO_2$ verður minni.

Onnur dømi uppá serskipanir er millum annað sjómannafrádráttur og fiskavirkisskipanin. Fiskavirkisskipanin er við til at fasthalda arbeiðsmegi í eini vinnu, sum ikki kann veita starvsfólkunum arbeiði árið runt. Hetta samstundis sum aðrir partar av búskapinum manglar arbeiðsmegi. Harumframt tálmar forðingin við ikki at kunna landa uttanlands, somuleiðis tillagingum til produktivitetsvøkstur, tí forðingin virkar sum vinnuligur stuðul til fiskavirking á landi. Slíkar serskipanir eru almennur stuðul til rakstur, ið hevur ilt við at bera seg av sær sjálvum. Slíkur almennur stuðul viðvirkar til at fasthalda arbeiðsmegi í eini ólønsamari vinnu, og kann elva til at kapitalur til íløgur leitar sær til vinnur, ið eru kunstiga lønsamar vegna almenna stuðulin.

Náttúrutilfeingi, ið eiga at verða viðgjørd á tílíkan hátt í vinnuligum samanhangi, kunnu vera livandi fiskatilfeingi, aliøki á firðum og á havøkjum, orkutilfeingi t.d. vatn-, vind- og streymasjóøki, og grundøki til vinnuligt brúk. Sum heild er náttúrutilfeingi tilfeingi, sum er avmarkað í mongd, og har einhvør framíhjárættur er galdandi. Viðvíkjandi fiskatilfeinginum er tað rætturin at veiða, sum eigur at bera gjald, og ikki framleiðsla á landi. Viðvíkjandi aling er tað rætturin at brúka aliøki á firðum og havøkjum, sum eiga at bera gjald, og ikki aling ella virking av alifiski uppi á landi. Viðvíkjandi orkuframleiðslu verður í hesum tíðum umrøtt at taka natúrliga monopolið frá SEV og lata fleiri fyritøkur kappast. Tað hevur her týdning at javnseta kappingarneytarnar og fáa mest úr tilfeinginum.

# 6 Fíggjarpolitiskt regluverk

Seinastu nógvu árini hevur gongdin í almennu nýtsluni og íløgunum verið konjunkturviðgangandi. Tá ið inntøkurnar hava verið stórar, hevur nógv verið brúkt og øvugt. Hetta vísir, at tað er torført hjá politisku skipanini at standa ímóti og ikki at økja um nýtsluna í góðum tíðum. Harvið hevur fíggjarpolitikkurin ført til at økja trýstið á búskapin tey góðu árini. Um alt avlopið verður brúkt tey góðu árini, verður oftani spart tá búskapurin er í afturgongd, og harvið verða ringar tíðir gjørdar enn verri. Sostatt hevur førdi fíggjarpolitikkurin økt um sveiggini í búskapinum. Tað er umráðandi at tað almenna ístaðin virkar stabiliserandi við støðugari gongd í rakstri og íløgum, tí búskapurin sveiggjar frammanundan av øðrum orsøkum. Búskaparráðið mælir tí politisku skipanini til at seta í verk eitt fíggjarpolitiskt regluverk, sum setir eitt hámark fyri, hvussu nógv almennu rakstrarútreiðslurnar kunnu veksa árliga.[20]

Eitt fíggjarpolitiskt regluverk økir um trúvirðið (kredittvirðið) hjá landinum, tí regluverkið ger politisku skipanina betri føra fyri at halda rakstrarútreiðsluvøksturin undir einum hámarki. Eisini kann eitt fíggjarpolitiskt regluverk gera langtíðar fíggjarpolitiska haldførið betri, um miðað verður eftir at fáa javnvág í millum útreiðslur og inntøkur uppá longri sikt við at hava tamarhald á útreiðsluvøkstrinum.

Eitt slíkt regluverk eigur at taka støði í einstaka búskapinum. Føroyski búskapurin er lítil og opin, og viðbrekin yvirfyri stoytum, ið koma uttanífrá. Í Føroyum innflyta vit nærum alt, sum vit nýta, og útflyta nærum alt, sum vit framleiða. Av tí, at vinnulívið í Føroyum byggir á sera fáar vinnugreinar, kunnu inntøkurnar hjá landskassanum sveiggja nógv. Tað er umráðandi, at útreiðsluvøksturin ikki fylgir inntøkuvøkstrinum, men at eitt hámark verður sett fyri, hvussu nógv rakstrarútreiðslurnar kunnu veksa, soleiðis at tað er møguleiki fyri at føra fíggjarpolitikk og tálma stutttíðarsveiggjum í búskapinum. Um hámark er fyri útreiðsluvøkstrinum tey árini búskaparvøksturin er stórur, førir tað til yvirskot í landsroknskapinum, og so er ikki neyðugt at skerja útreiðslurnar, tá tey ringu árini koma.

**Nettotilflyting, tal av persónum, 1985 til jun-2023** **Mynd 6.1**




**Viðm.:** 12 mánaðar leypandi samanlegging.

**Kelda:** Hagstova Føroya.

Fyrst í 90'unum høvdu Føroyar eina stóra skuld og eitt sera vánaligt kredittvirði, og danski staturin noyddist at yvirtaka skuldina. Almenna hallið var stórt og inntøkurnar minkaðu, og tí kundi politiska skipanin ikki føra stimbrandi fíggjarpolitikk, men var hinvegin tvungin at minka um almennu nýtsluna. Avleiðingin var stór búskaparlig afturgongd og stór fólkafráflyting; í árunum 1990 – 1995 flutti umleið 15% av fólkinum av landinum, sí mynd 6.1 og 6.2.

[20] Ein stutt frágreiðing um fíggjarpolitiskt regluverk er at finna á heimasíðu Landsbankans: https://www.landsbankin.fo/fo-fo/kunning/soeguligt-tilfar Fíggjarpolitiskt regluverk. Stutt lýsing. 2010

**Bruttotjóðarúrtøka 1980 - 2021** **Mynd 6.2**




**Viðm.:** Tjóðarroknskapartøl.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

Er skuldin lág, er frælsi til at føra fíggjarpolitikk[21]. Undir fíggjarkreppuni í 2008 var støðan frægari í føroyska búskapinum, enn í 90'unum. Í 2008 var almenna skuldin lág og kredittvirðið hampiligt (sí mynd 3.2 í parti 3 Almenn nýtsla og íløgur) og tí bar til hjá landinum at taka lán, so landið slapp undan at minka um almennu nýtsluna í árunum eftir 2008. Av tí sama var búskaparliga afturgongdin ikki merkisverd, og fólkafráflytingin ikki nær námind so stór, sum í 90'unum. Havast skal tó í huga, at ein partur av fráflytingini stavaði frá stórari tilgongd av ungum fólki til arbeiðsmarknaðin í hesum árunum, sum føroyski arbeiðsmarknaðurin ikki megnaði at taka ímóti.

Eitt fíggjarpolitiskt regluverk hevur fleiri stýringsamboð, men ikki øll stýringsamboðini eru líka væl egnaði til føroyska búskapin. Ein kann millum annað stýra eftir úrsliti, skuldarhámarki ella rakstrarútreiðsluhámarki.

At stýra eftir **úrsliti** meinast við, at tað verður sett eitt hámark fyri landskassans hall, ella at hall á fíggjarlógini skulu vendast til avlop innan nøkur heilt fá ár. Kemur búskapurin í afturgongd og inntøkurnar hjá landskassanum svíkja, er tað tó ikki skynsamt at tátta í fyri at fáa javnvág í almenna úrslitið ella fyri at halda hallið undir einum avísum hámarki, eins og royndirnar frá 90'unum vísa. Um búskapurin er í framgongd við veksandi almennum inntøkum, er heldur ikki skynsamt at stýra eftir úrslitinum, tí tað merkir, at politiska skipanin frítt kann nýta upp til hámarkið, ístaðin fyri at leggja til síðis til verri tíðir.

At stýra eftir **skuldarhámarki** merkir at ásett verður eitt hámark fyri skuld hjá almenna geiranum sum prosent av BTÚ. Tað er tó ivasamt, um tað er skynsamt at stýra eftir skuldarhámarki, tí um skuldarhámarkið longu er rokkið, tá ringar tíðir koma, so noyðist politiski myndugleikin at skerja almennu nýtsluna í teprum tíðum og harvið gera búskaparafturgongdina enn verri. Um skuldarhámarkið skal nýtast sum stýringsamboð, so er neyðugt, at politisku myndugleikarnir halda skuldina væl niðanfyri hámarkið í vanligum tíðum.

At stýra eftir **rakstrarútreiðsluhámarki** verður hinvegin viðmælt. Tá verður stýrt eftir einum hámarki fyri, hvussu nógv prosent almennu rakstrarútreiðslurnar kunnu veksa um árið. At hava eitt hámark fyri, hvussu nógv almennu rakstrarútreiðslurnar kunnu veksa, lættir um trýstið á politikararnar at økja um almennu nýtsluna og íløgurnar, tá ið tað gongur væl í búskapinum. Umráðandi er, at rakstrarútreiðsluhámarkið verður sett øllum almenna geiranum undir einum, tað vil siga ikki bert fyri landskassan, men fyri landið og kommunurnar undir einum.

[21] Umframt at rentuváðin er lægri, tá ið skuldin er lág.

Afturat einum rakstrarútreiðsluhámarki er skynsamt at gera eina framskriving av almennu inntøkunum og útreiðslunum so hvørt sum politisk tiltøk verða skotin upp, eitt nú 10 og 20 ár fram, so tað verður avdúkað, um inntøkurnar og útreiðslurnar javnviga í framtíðini. Ein framskriving vísir, hvussu stórur tørvurin er á at gera nýskipanir og sparingar. Hevur eitt hvørt politiskt uppskot við sær, at inntøkurnar ikki javnviga við útreiðslunum í framtíðini, skal uppskotsstillarin svara fyri, hvussu hann ætlar at fáa javnvág aftur millum inntøkurnar og útreiðslurnar.

Í Danmark er tað sum partur av fíggjarpolitiska regluverkinum "Budgetloven", at sett er eitt mark fyri, hvussu stórt almenna strukturella[22] hallið kann vera árliga. Markið hevur ligið á 0,5% av BTÚ, men varð broytt til 1% av BTÚ í 2022, tí royndirnar vísa, at tað til tíðir hevur verið ov stutt til markið, og at tað summa tíðir hevur verið óskymsamt fyri búskapin at noyðast at tátta í almennu útreiðslurnar fyri at lúka kravið um eitt alment hall á í mesta lagið 0,5% av BTÚ. Í ES-londum annars er markið 1% av BTÚ.

Eingin hagfrøðilig uppgerð fyri strukturella javnan er til vega í Føroyum. Seinastu 20 árini hava úrslit almenna geirans sum prosent av BTÚ verið støðugt og í miðal víst hall á umleið 1% av BTÚ. Tískil er eitt undirskot á 1% av BTÚ mett at vera umboðandi fyri strukturella javnan almenna geirans í Føroyum[23].

Danska Budgetloven ásetur millum annað, at eitt ovara mark fyri almennu útreiðslurnar skal samtykkjast fyri eitt 4-ára tíðarskeið, og at fíggjarætlanirnar skulu leggjast til rættis innan fyri hetta ovara markið. Harafturat er tað eitt mark fyri hallið á strukturella javnanum, umframt revsitiltøk móti kommunum og regiónum, um tær, í hvørjum einstøkum fíggjarári ikki yvirhalda avtaluna við donsku stjórnina um markið fyri almennu útreiðslurnar. Budgetloven varð samtykt í 2012, sum eitt aftursvar til áhaldandi ovurnýtslu í almenna geiranum, og tí kommunurnar og regiónurnar høvdu ov lítið afturhaldni og lótu almennu útreiðslurnar veksa í hákonjunkturinum fram til fíggjarkreppuna í 2008. Budgetloven hevur viðvirkað til at tað er tamarhald á almenna útreiðsluvøkstrinum í Danmark[24].

**Tal av pensjónistum** **6.3a**




**Lutfall millum abeiðsfjøld og pensjónistar** **6.3b**




**Viðm.:** 2023-2062 eru framroknaði tøl. Talið av pensjónistum er talið av fólki omanfyri pensjónsaldur. Pensjónsaldurin hækkar til 67,5 ár í 2025 og 68 ár í 2030 í mynd 6.3a. Á mynd 3.6b vísir bláa strikan lutfallið millum arbeiðsfjøld og pensjónistar, tá ið pensjónsaldurin er 67 ár alt tíðarskeiðið. Reyða stikan vísir, tá ið pensjónsaldurin hækkar við hálvum ári í 2025 og 2030. Grøna strikan vísir, tá ið pensjónsaldurin hækkar við hálvum ári 5. hvørt ár alt tíðarskeiðið.
**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í fólkatalsframrokningini hjá Hagstovu Føroya.

---

22 Strukturelli javnin er almenna úrslitið reinsað fyri óvanligar inntøkur og útreiðslur og konjunktursveiggj. Inntøkur og útreiðslur sum tilfeingisgjøld, blokkstuðul ella varandi skattalættar, ið eru afturvendandi, roknast uppí strukturella javnan, meðan serligar inntøkur, sum einstøk vinningsbýti ella útreiðslur sum td. hjálparpakkar í krepputíð, ikki væntast at vera afturvendandi, verða frároknaði í strukturella javnanum.

23 Kelda: Landsbanki Føroya.

24 De Økonomiske Råd, dors.dk.

Atlitið til kredittvirðið hjá landinum, og at tað er fíggjarligt rásarúm til at føra fíggjarpolitikk, eru nóg stórar orsøkir til at hava eitt fíggjarpolitiskt regluverk, men avbjóðingin við vaksandi talinum av eldri fólki ger, at tað er uppaftur meira átrokandi at seta eitt slíkt regluverk í verk. Ein framskriving av fólkatalinum í Føroyum vísir, at talið av eldri fólki veksur lutfalsliga skjótt í mun til talið av fólki í arbeiðsførum aldri, og tað fer serliga at økja um almennu útreiðslurnar til fólkapensjón og heilsu- og røktartænastur til eldri fólk.

Mynd 6.3a og b vísa, at demografisku broytingarnar gera, at vit vera alsamt færri persónar í arbeiðsførum aldri fyri hvønn pensjónist. Á myndini sæst, at tað í 1988 vóru 6,5 fólk í arbeiðsførum aldri fyri hvønn pensjónist, meðan vit í dag eru 4 fólk fyri hvønn pensjónist. Um 40 ár verða vit einans 2,3 fólk í arbeiðsførum aldri fyri hvønn pensjónist við verandi skipan. Um pensjónsaldurin hækkar við hálvum ári 5. hvørt ár, tá verða vit 2,9 fólk í arbeiðsførum aldri fyri hvønn pensjónist.[25] Sostatt vísir myndin, at lutfallið av teimum, ið skulu forsyrgjast veksur, og tað kemur at leggja trýst á almennu útreiðslurnar. Neyðugt er tí at fremja nýskipanir, sum ger haldførið hjá landskassanum betri.

Í 1988, tá ið Føroyar yvirtóku almannamál og harvið útreiðslurnar til fólkapensjón, livdi vanligi føroyingurin í miðal 15 ár, tá hann var farin upp um pensjónsaldurin 67, men í dag liva føroyingar í miðal 19 ár sum pensjónistar. Fólkapensjónin er ein stórur partur av útreiðslunum til almannamál; í 2023 eru 2 mia. kr. játtaðar til almannamál, og harav fara um 700 mió. kr. (35%) til fólkapensjón og til viðbót til ávísar pensjónistar. Fólkapensjónin kemur, alt annað líka, frameftir at vera ein størri og størri upphædd á fíggjarlógini, bæði tí at vit gerast alsamt nógv fleiri pensjónistar, sí mynd 6.3a, men eisini tí vit í dag liva longri sum pensjónistar.

Eitt tiltak, ið kann verða við til at minka um framtíðar trýstið á fíggjarlógina, er at hækka pensjónsaldurin og sostatt økja um arbeiðsútboðið. At hækka pensjónsaldurin ger bæði inntøkusíðuna hjá landskassanum betri og minkar um útreiðslurnar hjá landskassanum til fólkapensjón. Pensjónsnýskipanarnevndin mælti í 2009 til at hækka pensjónsaldurin við einum hálvum ári fimta hvørt ár við byrjan longu í 2012, men pensjónsaldurin er ikki samtyktur til at hækka fyri fyrstu ferð fyrr enn í 2025. Í 2025 og í 2030 hækkar pensjónsaldurin við einum hálvum ári. Mynd 6.3b vísir, at hóast pensjónsaldurin hevði hækkað við hálvum ári 5. hvørt ár fram til 2060, verður núverandi lutfall millum arbeiðsfjøld og pensjónistar ikki varðveitt.

**Árlig nettotilgongd av 80+ ára gomlum** **Mynd 6.4**




**Viðm.:** Tal av fólki árliga (miðal yvir 5 ár).
**Kelda:** Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

[25] Pensjónsaldurin hækkar uppí 67,5 ár í 2025 og 68 ár í 2030. Skipan við livitíðar indeksi verður sett í verk frá 2035. Fimta hvørt ár skal pensjónsaldurin eftirmetast í mun til gongdina í miðal lívsævi hjá 65 ára gomlum. Pensjónsaldurin kann í mesta lagi hækka 1/2 ár fyri hvørja eftirmeting. Talan kann sostatt í mesta lagi verða um 1/2 ára broyting fimta hvørt ár sambært núverandi lóggávu.

Í mynd 6.4 sæst, at tað í árunum fram til 2020 hevur verið ein tilgongd av fólki omanfyri 80 ár á umleið 40 fólkum árliga í miðal, meðan tað í árunum frá 2020 heilt fram til 2050 fara árliga at leggjast umleið 100 fólk yvir 80 ár afturat verandi skara av fólki omanfyri 80 ár. Hetta fer at seta eitt stórt trýst á almennu rakstrarútreiðslurnar, tí tað eru serliga vælferðartænasturnar til fólk omanfyri 80 ár, sum eru kostnaðarmiklar fyri samfelagið. Sambært meting hjá Landsbankanum fara eldraútreiðslurnar hjá landskassanum og kommununum við verandi prísum at veksa við 65 mió. kr. árliga næstu 12 árini ella við 800 mió. kr. tilsamans fram til 2035. Hetta merkir, at landskassin og kommunurnar tilsamans fara at fáa stór hall um fá ár, og tí er stórur tørvur á at fáa eitt fíggjarpolitiskt regluverk.

# Fylgiskjal 1

**Kortnýstla hjá føroyingum uttanlands, % av samlaðu kortnýstluni, jan-19 til jul-23**




**Kelda:** BankNordik og Betri Banki. Hagtølini eru deflateraði við brúkaraprístalinum (egnar útrokningar).

# Keldur

Avrik sp/f, Hvalvík

BankNordik

Betri Banki

Betri Heim

Danmarks Nationalbank (gjaldoyrakursir)

De Økonomiske Råd

ECB

Felagið Nótaskip

Fishpool.eu

Fíggjarmálaráðið (fíggjarlóg)

Føroya Gjaldstova, Búskaparskipan Landsins (BSL) og landsroknskapurin

Hagstova Føroya, hagtøl og tíðindaskriv

Havstovan og ICES

IMF (altjóða útlit)

Landsbanki Føroya, MFI hagtøl, útrokningar og metingar

Lív, ársroknskapur 2022

Samrøður við fólk innan byggivinnuna

Samrøður við fólk innan botnfisk, fiskavirkir, uppsjóvarvinnu og Barentshavið

Samrøður við fyritøkur í alivinnuni

Vinnuhúsið

Vørn

# Tables and figures


| | |
|---|---|
| Talva 1.1 / Table 1.1 | GDP percentage year-on-year growth in current prices, 2020 to 2024. |
| Mynd 1.1 / Figure 1.1 | GDP growth in current prices and fixed 2010-prices, 2008 to 2024. |
| Mynd 1.2 / Figure 1.2 | Real GDP growth and growth contribution from industrial sectors, 2009 to 2024. |
| Mynd 1.3 / Figure 1.3 | GDP growth in current prices and growth contribution, 1999 to 2024. |
| Mynd 2.1 / Figure 2.1 | Business trends survey for households: Total Confidence indicator for Faroese households, jan-06 to jun-23. |
| Mynd 2.2 / Figure 2.2 | The current economic situation of the Faroese households, jan-06 to jun-23. |
| Mynd 2.3 / Figure 2.3 | Unemployment rate percentage (left axis) and net immigration (right axis) calculated as 12-month rolling total, jan-99 to jun-23. |
| Mynd 2.4 / Figure 2.4 | Number of wage earners and number of unemployed, jan-08 to jul-23. |
| Mynd 2.5 / Figure 2.5 | Inflation, consumer price index %-changes, may-12 to may-23. |
| Mynd 2.6 / Figure 2.6 | Consumer price index, selected categories, percentage change (yearly), feb-12 to may-22. |
| Mynd 2.7 / Figure 2.7 | Payment card transactions in mill. DKK in current prices, domestic and abroad, jan-19 to jul-23. |
| Mynd 2.8 / Figure 2.8 | Retail trade index, trend in fixed prices, 1. quarter 1995 to 1. quarter 2023. |
| Mynd 2.9 / Figure 2.9 | Wages and imported commodities by households. |
| Mynd 2.10 / Figure 2.10 | Average market prices in real estate in thousand DKK, Tórshavn (houses and apartments), other cities and larger villages (houses) and smaller villages (houses), 1985 to 2023. |
| Mynd 2.11 / Figure 2.11 | Real estate prices and disposable income (index 1998=1), Growth in real house prices (Growth in real house prices right axis), 1998 to 2023. |
| Mynd 2.12 / Figure 2.12 | Business trends surveys: Total confidence indicator, for consumers and industry, jan-07 to jun-23. |
| Mynd 2.13 / Figure 2.13 | Business trends barometer for construction, June 2006 to Jun 2023: perceived limitations in production (none, demand, weather, labour, raw material/equipment, financial limitations, other). |
| Mynd 2.14 / Figure 2.14 | Foreign workers in percentage of combined workforce, selected branches of industry, jan-00 to jul-23. |
| Mynd 2.15 / Figure 2.15 | Net immigration grouped by Danish citizen or other citizens, 2000 to 2022. |

Mynd 3.1 / Figure 3.1 Central government financial results (central government budget balance) in DKK millions, 1998 to 2024. RLÚ1: ordinary, and RLÚ1 as a percentage of GDP.

Mynd 3.2 / Figure 3.2 Net public debt of the central government, 1998 to 2024, in DKK millions, (excluding equipment).

Mynd 3.3 / Figure 3.3 Government (i.e., public) consumption in DKK millions and yearly growth in government consumption in percent (right axis), 2000 to 2024.

Mynd 3.4 / Figure 3.4 Government investments in DKK millions, 2003 to 2024.

Mynd 4.1 / Figure 4.1 Balance of foreign trade (goods only) calculated as 12-month rolling total, jan-94 to jun-23, in DKK millions (ships excluded, ships included).

Mynd 4.2 / Figure 4.2 Import and export of products (excluding ships and airplanes), jan-94 to jun-23.

Mynd 4.3 / Figure 4.3 Export of three types of fish products, calculated as 12-month rolling total, jan-94 to jun-23, in DKK millions (salmon, pelagic fish, demersal fish).

Mynd 4.4 / Figure 4.4 Catches in tons from sea farming, 1998 to 2023.

Mynd 4.5 / Figure 4.5 Weekly spot prices for salmon in Danish kroner (DKK), jan-04 to aug-23.

Talva 4.1 / Table 4.1 Faroese quotas for pelagic fish (mackerel, herring and blue whiting) and demersal fish, for the years 2022 and 2023.

Mynd 4.6 / Figure 4.6 Unit prices in the exports of mackerel and herring, based on 12 months rolling total, jan-95 to jun-23.

Mynd 4.7 / Figure 4.7 Unit prices in the exports of demersal fish (cod, haddock and saithe), based on 12 months rolling total, jan-95 to jun-23.

Mynd 5.1 / Figure 5.1 Cod in Faroese waters: estimated stock and catches (in tons) and fishing intensity 1959 to 2025.

Mynd 6.1 / Figure 6.1 Net immigration, 1985 to jun-23.

Mynd 6.2 / Figure 6.2 GDP growth and changes, 1980 to 2021.

Mynd 6.3a / Figure 6.3a Number of people who have reached retirement age, 1985 to 2062.

Mynd 6.3b / Figure 6.3b Number of people in the work force for each person who has reached retirement age, 1985 to 2062.

Mynd 6.4 / Figure 6.4 Growth of elderly people above the year of 80, period of 5 years, 2000 to 2060.

Fylgiskjal 1/Appendix 1 Payment card transactions abroad, in percentage of total card transactions, January 2019 to July 2023.

## Tíðindaskriv frá Búskaparráðnum 1. september 2023

# Búskapurin er væl fyri - í løtuni

*Vøksturin í BTÚ í leypandi prísum er mettur til 8,1% í 2022, 5,9% í 2023 og 1,4% í 2024. Í 2023 og 2024 eru prísirnir ikki mettir at veksa eins nógv, sum í 2022, og vøksturin í BTÚ í leypandi prísum hesi bæði árini verður tí lægri enn í 2022. Tørvur er á einum fíggjarpolitiskum regluverki, so tamarhald fæst á almenna útreiðsluvøkstrinum. Um fá ár verða tað lutfalsliga fáir skattgjaldarar, sum skulu tryggja vælferðarsamfelagið, sum vit hava í dag. Við atliti til komandi ættarliðini eigur politiska skipanin tí ikki at samtykkja uppskot, sum økja framtíðar útreiðslurnar. Harafturat eigur landið at avtaka serskipanir, sum minka um arbeiðsútboðið í Føroyum.*

**Búskapurin framvegis í framgongd**

Lyklatølini vísa framvegis, at føroyski búskapurin er í framgongd. Framleiðslan (BTÚ í leypandi prísum) er mett at veksa 5,9% í 2023, arbeiðsloysið er søguliga lágt, samlaðu lønarútgjaldingarnar eru veksandi, tal av fólki í starvi setur met, og handilsjavnin hevur framhaldandi stórt yvirskot. Seinasta árið hevur inflasjónin verið høg, men prísirnir veksa ikki eins skjótt í 2023 sum í 2022. Harafturat er rentan hækkað. Livikostnaðurin hjá húsarhaldunum er tí øktur, ið millum annað sæst aftur í, at eftirspurningurin eftir eitt nú klæðum og dýrum innbúgvi er minkaður, meðan matvørurnar fylla meira í samlaðu nýtsluni. Hinvegin sæst á kortnýtsluni, at nýtslan uttanlands hevur verið eins stór á sumri 2023, sum í fjør. Sambært konjunkturbarometrinum hjá Hagstovuni, eru húsarhaldini við gott mót, og kann tað møguliga skyldast, at tey ikki eru stúrin fyri at missa arbeiðið, nú arbeiðsloysið er so mikið lágt, og vit hava starvsfólkatrot. Vinnan, serliga tilfeingisvinnan, er hinvegin meira stúrin. Tað kemur millum annað av, at tað higartil í 2023 hevur verður trupult at selja makrelin til matna, at goymslurnar eru øktar, og at vinnan væntar lægri prísir á ymsum fiskasløgum samanborið við høgu prísirnar í 2022. Harafturat kunnu politisku útmeldingarnar um broytingar í fiskivinnusamstarvinum við Russland og óvissurnar um útflutningin til Russlands hava havt sína ávirkan, tá ið kanningin varð gjørd í juni 2023. Byggivinnan hevur hinvegin tryggjað arbeiði í minsta lagið 1,5 ár fram, men mangul á skikkaða arbeiðsmegi er framvegis ein stór avbjóðing.

**Úrslitini ov vánalig**

Úrslitið á fíggjarlógini metir Búskaparráðið verður -30 mió. kr. í 2023 og -202 mió. kr. í 2024. Tað er lítil ivi í, at hall á fíggjarlógini í 2023 og 2024 ikki er nóg væl frágingið, tá ið føroyski búskapurin framvegis er í vøkstri við metlágum arbeiðsloysi og inntøkuvøkstri í landskassanum. Hetta bæði sæð í mun til konjunkturstøðuna í løtuni og í mun til veksandi avbjóðingina við haldførinum, tá vit fara at gerast munandi fleiri eldri fólk í mun til tey í arbeiðsførum aldri – í so máta átti tað verið stór avlop í 2023 og 2024.

**Haldførisavbjóðingin má handfarast**

Neyðugt er at fremja nýskipanir, sum betra um haldførið hjá landskassanum – longri vit bíða, størri verður rokningin, sum vit lata yngru ættarliðunum. Dømi um eina nýskipan, sum er neyðug fyri at betra um haldførið, er at hækka pensjónsaldurin meira enn tað, sum longu er samtykt. Tað ávirkar bæði inntøku- og útreiðslusíðu landskassans.

**Trot á arbeiðsmegi**

Arbeiðsloysið er søguliga lágt; eitt nú fáa foreldur ikki ansað sínum børnum fulla tíð og ellisheim mugu steingja stovur, tí teimum vanta starvsfólk. At stytta arbeiðsvikuna minkar um útboðið av arbeiðsmegi. Um landsstýrið heldur fast við ætlanina at stytta arbeiðsvikuna, verður neyðugt at økja arbeiðsútboðið á annan hátt, umframt at fíggja átakið, so tað ikki ger fíggjarpolitiska haldførið verri.

Veksandi talið av eldri fólki fer harumframt at krevja ein enn størri starvsfólkahóp í framtíðini. Avleiðingin av vantandi arbeiðsmegi er, at framleiðslan í landinum, og harvið vælferðin, verður minni, enn hon kundi verið. Búskaparráðið mælir tí politisku skipanina til at avtaka serskipanir, sum minka um arbeiðsútboðið í Føroyum; eitt nú serskattaskipanir til føroyingar, sum arbeiða uttanlands. Eitt tiltak, sum hinvegin økir um

arbeiðsútboðið, er at hækka pensjónsaldurin. Almennur stuðul til fiskavirkir gjøgnum fiskavirkisskipanina ella makrelstuðul til heimaflotan eigur heldur ikki at verða latin, tí tað er við til at fasthalda arbeiðsmegi í eini ólønsamari vinnu.

**Tørvur á fíggjarpolitiskum regluverki**

Politiska skipanin eigur at seta í verk eitt fíggjarpolitiskt regluverk, sum setir hámark fyri útreiðsluvøksturin. Tað lættir um trýstið á politikararnar at økja almennu nýtsluna og íløgurnar, tá ið tað gongur væl í búskapinum. Eisini eiga politikararnir at framskriva almennu inntøkurnar og útreiðslurnar so hvørt sum politisk tiltøk verða skotin upp, so tað er sjónligt hvat uppskotið um, eitt nú skattalætta, kostar 10 og 20 ár fram í tíð, tí um fá ár verða tað lutfalsliga fáir skattgjaldarar, sum skulu tryggja vælferðarsamfelagið, sum vit hava í dag. Við atliti til komandi ættarliðini eigur politiska skipanin tí ikki at samtykkja uppskot, sum leggja trýst á framtíðar almennu útreiðslurnar; sum til dømis at strika mótrokningina í pensjónini.

# Summary

The Economic Council of the Faroe Islands has revised the growth in GDP for 2022 – 2024 on basis of new data, and Statistics Faroe Islands has published final GDP growth figures in current prices for the years 1998 – 2021. In cooperation with Statistics Faroe Islands, the Economic Council has estimated the growth in GDP to be respectively 8.1% in 2022, 5.9% in 2023 and 1.4% in 2024.

| | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| GDP growth in current prices: | -2.7% | 8.0% | 8.1% | 5.9% | 1.4% |

**Note:** 2020 and 2021 are Statistics Faroe Islands' statements. 2022, 2023 and 2024 are estimates made by the Economic Council of the Faroe Islands.
**Source:** Statistics Faroe Islands and the Economic Council of the Faroe Islands.

The key figures continue to show growth in the Faroese economy. Production (GDP) is expected to grow 5.9% in 2023, unemployment rates are historically low, wage expenditures are growing, employment is record high, and the balance of trade continues to remain in surplus.

Households have experienced high **increases in prices and interest rates** over the past year, but they are slightly more optimistic according to the latest consumer sentiment report from Statistics Faroe Islands. The number of households that find it difficult to make ends meet has not grown between January and June in 2023, and the financial institutions report only a slight increase in households that have asked for deferments so far in 2023 compared to one year ago. **Prices are increasing at a slower pace** now, compared to the past year, but more expensive groceries and interest rates hikes have made the cost of living for households higher; therefore, it is not unlikely that some of those who already were financially stretched will end in a more difficult situation if interest rates continue to rise. It is difficult to cut down on basic goods such as food, fuel and electricity; therefore, Faroese households have chosen to spend less on clothes, shoes and expensive furniture in the first quarter of 2023 compared to the previous year. Car dealerships also report that demand for cars has decreased significantly. On the other hand, the household's consumption abroad in the summer of 2023 has been at the same level as in the previous year. This would suggest that consumer sentiment is relatively high. **The Unemployment rate is historically low** (0.7% in July 2023), which means that most people in the workforce are employed, which in return allows them to maintain a certain level of consumption, even though they get less for their money.

Due to the increase in the cost of living, banks now set more stringent requirements for disposablemonthly amount, which in return limits how high price offers households can submit on houses. Additionally, building materials have become very expensive, making people reluctant to build new houses or buy one that requires major renovations. In and around Tórshavn, fewer houses were sold in the last six months of 2022, however, the number of sales increased again in the first half of 2023. **House prices** in and around Tórshavn are slightly **down** in the first half of 2023 compared to the first six months of 2022. However, if the first half of 2023 is compared to whole year 2022, then house prices in and around Tórshavn are more or less unchanged.

Statistics Faroe Islands' confidence barometer showed that the primary sector is less optimistic in June 2023 compared to January 2023. This is due to decrease in demand, increase in stock and expected price drops compared to 2022. The price of cod is expected to fall in the second half of 2023 and stay steady in 2024. As for salmon, both volume and prices are estimated to remain unchanged in 2023 compared to 2022, while the price is expected to drop slightly in 2024 while the volume produced is expected to increase slightly. However, the export of fishmeal pushes the total export value up in 2023, which is due to a significant increase in the quota for blue whiting in 2023 compared to 2022. The demand for mackerel is low at the moment, and some of the mackerel is landed abroad, to be produced to fishmeal, which decreases the export value of mackerel. However, the volume is expected to be the about the

same in 2023 and 2024 as in 2022. Political statements on changes in fisheries cooperation with Russia and uncertainties regarding export to Russia might have affected the answers given by the primary sector in the June 2023 report. In addition to export of fish, **tourism** is an export industry. So far this year, the activities regarding transportation of travellers, such as flight activity, have been very high, and almost all beds in hotels were occupied in June.

There are several large ongoing government, municipal and private building projects, which means that the major companies in **the construction industry** have ongoing projects for at least the next year and a half. The construction industry reports that lack of labour is the greatest and nearly the sole limitation in the construction industry today.

The Economic Council estimates that **the central government budget** will have a **deficit of DKK 30m in 2023** and a **deficit of DKK 202m in 2024**. The estimate is based on the latest budget proposal for 2023 that showed a surplus of DKK 150m. However, the Economic Council estimates that a further ca. DKK 150m of postponed investments will be used in 2023, and the Ministry of Finance estimates an additional DKK 30m or so in supplementary appropriations to cover various operational costs. For the 2024 central government budget, the Economic Council has projected the Treasury's expenses and income, and the estimated result is a deficit of about DKK 200m in 2024. This corresponds to the appropriation frameworks for 2024, as well as adding DKK 50m in postponed investments. Keeping in mind the growth in the Faroese economy with its record low unemployment rate and a growth in the Treasury's income, it is undoubtedly the case that a deficit in 2023 and 2024 is **poor fiscal management**—also considering both the current economic cycle and the growing challenge relating to fiscal sustainability as the ratio of older people to those in an employable age grows significantly.

**Recommendations**

The Faroes face a fiscal sustainability challenge. In a few years there will be relatively few taxpayers to support a welfare state like the one we have today. That the number of retired people grows proportionally faster than the employable population will result in public expenses outgrowing income. Therefore, **reforms must be initiated** now that **will improve fiscal sustainability** – the longer we wait, the higher the bill we leave for coming generations. One reform needed to improve sustainability is to **raise the retirement age**, which will have an effect on both the treasury's income and expenses.

Another reform that will lessen public expenses is to **establish a fiscal policy regulation**. Public expenses and investments have been correlating positively with the economic cycles over the last many years. When government revenues have been high, spending has been high and vice versa. This shows that it is difficult for the political system to stand against the pressure and not increase expenses in good times. In this way, economic policies have contributed to heating the economy in good times. Fiscal policy regulations must place a limit on the annual growth in public operating expenses to lessen the pressure on politicians to increase spending and investment, when the economy is doing well.

The political system also ought to make prognoses of government revenuesand expenses, when political initiatives are proposed. E.g., if lower taxes are proposed, the cost should not be calculated only for the fiscal year in which the new tax rates are to be initiated but also what they will cost in the next ten to twenty years. Thus, it becomes transparent what the entire tax relief costs. Such a prognosis would show what is needed in reforms and cuts if the proposal is initiated, and whether the proposal improves or worsens fiscal sustainability. Considering future generations, the political system ought **not** to **pass proposals which will put a pressure on future public expenditures**, such as cancelling set-offs in pension payments.

The great upturn in the Faroese economy is reflected in the low unemployment rate. The Faroes have for an extended period of time had historically low unemployment numbers, and a significant challenge for the economy is **lack of labour**. At the moment the challenge with lack of labour appears in several

places in society, e.g. due to staff shortage, many kindergartens have to close early, and senior homes have to shut down rooms. The political system needs to take this grave situation seriously. **To shorten the workweek reduces the supply of labour**. If the government continues with its plan to shorten the workweek, it will be necessary to increase the available labour market in another way as well as to finance the initiative so that the fiscal sustainability does not worsen. The growing number of older citizens calls for a greater supply of labour in the coming years. The consequence of the lack of labour is that production—and with it, welfare—will be lower than it could be. One consequence may be that the industry will hold back on new investments because they cannot find the employees needed. The political system should therefore **annul special arrangements that reduce labour supply** in the Faroes, such as tax deduction for Faroese who work abroad or state subsidy to fish factories through Fiskavirkisskipanin (a political instrument to subsidise fish factories), which keeps labour in a non-profitable industry. Nor should subsidy be given to fishermen through tax deduction for those working at sea (sjómannafrádráttur) or to the demersal fleet through mackerel quotas. One initiative, on the other hand, that increases labour supply is raising the retirement age.